Nr. 11 • oktober 2011

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Páll Hansen (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Eyðstein Djurhuus.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Saeborg, nýggja frálandaskipið hjá Supply Service, kom til Føroya 24. september.

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900

# Makrelur, løgtingslóg og eftirlit



Nú makrelfiskiskapurin er av á hesum sinni kann man frøast um, at fiskiskapurin hevur verið góður og, at landskassin hevur fingið eitt gott íkast av makrelsøluni.

Men samstundis hevur tað víst seg, at vera sera óskipað fleiri staðni t.d. hevur løgtingslógin um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi ikki verið fylgd.

Í hesi lóg stendur millum annað: *§5. Manning á fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum fáa fiskiloyvi at fiska makrel í 2011, skal verða lønt samsvarandi sáttmálum, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum.*

Tað kann væl ikki vera pedagogsáttmáli, starvsmannafelagssáttmálin ella sáttmálin fyri farmaskip, sum løgtingið hevur hugsað um, tá lógin bleiv samtykt.

§8 í lógini ljóðar soleiðis: *Hóast ásetingarnar í hesi lóg og løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, kann landsstýrismaðurin loyva eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi at fiska makrel í 2011 við fiskifari undir fremmandum flaggi, tá tað skal nýtast fyri fiskifar undir føroyskum flaggi, sum orsakað av bráðfeingis óhappi ikki kann fara til fiskiskap.*

*Stk. 2. Tá talan er um leigað fiskifar undir fremmandum flaggi, sum fær loyvi at fiska makrel í 2011 sambært stk. 1 í hesi grein eru rættindi og skyldur eigarans í §5 at skilja sum rættindi og skyldur leigarans.*

Og sambært §10 er revsingin bót um hesin brýtur ásetingina í §5.

Samstundis sum makrelfiskiskapurin byrjaði, sendu manningarfeløgini skriv til Fiskimálaráðið/eftirlitið og vístu á lóggávuna. Men her hendi onki. Við ikki at gera nakað við hendan trupulleika, fjálgar eftirlitið um teir reiðarar, sum ikki fylgja lógini. Hesir hava fingið betri rættindi enn føroyskir reiðarar, sum hava fylgt lóggávuni. Hetta er óverdugt, og samstundis ein stórur trupulleiki.

Hetta vísir eisini, at eftirlitið ikki rættuliga megnar sína uppgávu. Vit hava eisini sæð einstakar føroyskar trolarar, sum ikki hava hildið seg til avtalaðar sáttmálar.

Her er øll orsøk til at rópa varskó. Tað sær út til, at endamálið hjá hesum reiðarum er, at undirgrava fakfelagsrørsluna á sjónum. Men í longdini fer hetta at raka alt samfelagið og seta menningina nógv ár aftur.

Eisini á landi skapar makrelurin trupulleikar. Vit hava virkir, sum útlendingar eiga. Hesir virða ikki teir sáttmálar, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum, hóast virkið er limur í Vinnuhúsinum. Tað er ongin trupulleiki at fáa útlendingar til landið. Hesir fáa arbeiðst- og uppihaldsloyvi beinan vegin teir søkja, samstundis sum føroyingar verða koyrdir til hús. Her er eisini orsøk til at rópa varskó.

Samanumtikið kann sigast, at hóast fiskiskapurin hevur verið góður, so hava fleiri trupulleikar víst seg, sum mugu rættast komandi ár.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Páll Hansen ábyrgdarblaðstjóri*







# Innihaldsyvirlit


Norsk skip hála FAS niður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Samskifitsfólk styrkir FAS skipanina . . . . . . . . . . . 7
Gráa flaggið um at gerast hvítt . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Sjálvstýrisflokkurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Tjóðveldi. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Fólkaflokkurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
Sambandsflokkurin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
Framsókn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
Miðflokkurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
Javnaðarflokkurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18
Komandi maskinmeistaraútbúgving . . . . . . . . . . 20
Skitnu fingrarnir hvørva í turrari teori. . . . . . . . . . 21
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum. . . . . 24
Semja um farmaskip . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum. . . . . . . . . . . 26
Føðingardagar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
Olaf Kruse í brennideplinum. . . . . . . . . . . . . . . . . . 29
Nær kemur toskurin fyri seg? . . . . . . . . . . . . . . . . 30
Fundur um sjóvinnumál í Gøteborg. . . . . . . . . . . . 33
Elias Johannesen: So gott sum heima . . . . . . . . . . . 36
Saeborg kom til Føroya 24. september . . . . . . . . . . 37







# Norsk skip hála FAS niður

Nú vantar ógvuliga lítið í, áðrenn Føroyar sleppa á hvíta listan hjá evropeisku skipaeftirlitssamstarvinum Paris MoU. Serliga gomul norsk skip undir føroyskum flaggi hava verið eftirbátar viðvíkjandi trygdini, so neyðugt hevur verið at hildið teimum aftur í evropeiskum havnum.

*Eftir Ingolf S. Olsen*



*Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri í Sjóvinnustýrinum, heldur, at 20 ára aldursmarkið fyri skip, sum vilja skrásetast í FAS, skundar undir gongdina at fáa Føroyar á hvíta listan hjá Paris MoU.*

Tað gongur niður eftir hjá Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, FAS, á listanum hjá evropeiska skipaeftirlitssamstarvinum Paris MoU, og í teirra mátistokki fyri trygd umborð og umhvørvistrygd er tað ein jalig gongd.

Paris MoU brúkar eitt heldur torskilt roknistykki at rokna út, um eitt ávíst land skal setast á hvíta listan, grá listan ella svarta listan viðvíkjandi trygdini umborð og umhvørvistrygdini. Úrslitð av roknistykkinum er eitt miðalfrávik frá talinum 0. 0 ella niðanfyri 0 merkir, at alt er í lagi, og landið sleppur á hvíta listan. Er talið millum 0 og 1, verður landið sett á gráa listan, og er skilið so vánaligt, at talið fer upp um 1, er svarti listin vísur.

Føroyar eru enn á gráa lista, men seinastu árini hevur tað støðugt gingið rætta vegin. Sostatt var frávikið 0,28 við árslok 2008, 0,22 við árslok 2009 og 0,07 við árslok í fjør.

– Jaliga gongdin er úrslit av átøkunum, vit hava gjørt. Tað hevur eydnast okkum at fáa ein góðan dialog við reiðaríini, sum sjálvsagt eisini eru áhugað í, at FAS sleppur á hvítalista, og at PSC-eftirlit (Port State Control, red.) ikki skal verða í tíð og ótíð, sigur Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri í Sjóvinnustýrinum, sum gamla Skipaeftirlitið eitur nú.

## TEY FÁU SPILLA SPÆLIÐ

Hóast flestu av teimum 65 skipunum í FAS eru í góðum standi, og



*Hóast Føroyar ikki hava limaskap í evropeiska skipaeftirlits-samstarvinum Paris Mou, so leggur Sjóvinnustýrið við høvuðssæti í Miðvági nógva orku í at fáa Føroyar upp á hvíta listan har.*

mannagongdirnar um borð verða hildnar í samsvar við altjóða sáttmálar og ásetingar, so eru tað kortini nøkur fá, ið oyðileggja myndina.

– Tað eru serliga, tá skip verða hildin aftur í útlendskum havnum, at tað telur ógvusliga niður fyri FAS. Higartil í ár eru tvey skip afturhildin, og tað eru tvey ov nógv, staðfestir Vilhjálmur Gregoriussen.

31. august var coastarin Helene hildin aftur í týska havnabýnum Cuxhaven, og 3. februar var ro-ro farmaskipið Cometa hildin aftur í Oslo. Í báðum førum er talan um norsk skip.



*Gev gætur, at tað ikki er føroyska Merkið sum hálar FAS niður. Norsk skip hála føroyska Merkið niður.*

Vilhjálmur Gregoriussen vil ikki sjálvur taka dagar imillum, hvør skikkar sær best, og hvør skikkar sær ringast, men á listanum hjá Paris MoU sæst, at tað serliga eru eldri norsk skip undir føroyskum flaggi, sum fáa nógvar viðmerkingar, ella verða afturhildin, tá eftirlit verður framt umborð á teimum.

Ongir trupulleikar eru hinvegin við nógvu svensku skipunum í FAS.

Nógv gomul skip eru í FAS, bæði føroysk og útlendsk, og tað ger tað ikki lættari at røkka hvíta listanum.

## 20 ÁRA ALDURSMARK

Miðalaldurin á FAS-skrásettu skipunum er 25 ár, og á nýggjárinum herdi Paris MoU eftirlitið við skipum eldri enn 12 ár.

Í maj samtykti Løgtingið eina lógarbroyting fyri FAS, sum hevði við sær, at tað í høvuðsheitum ikki longur skal bera til at skráseta skip eldri enn 20 ár har.

Aldursmarkið varð væl móttikið av nógvum, men hvassar atfinningar vóru eisini, millum annað frá Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, RFF. Í lógaruppskotinum var ein grundgeving fyri aldursmarkinum, at tað tá fór at verða lættari at koma á hvíta lista hjá Paris Mou. Til hetta svaraði RFF soleiðis í hoyringsskrivi:

„ ... Her kann bara verða gjørt vart við, at eitt illa rikið 15-ára gamalt skip, sum verður afturhildið, hevur verri ávirkan á listan hjá Paris Mou, enn eitt væl rikið 25-ára gamalt skip. Aldurin á skipinum hevur ikki nakra beinleiðis ávirkan á listan. Hinvegin hevur tal av skipum í FAS stóra ávirkan á, hvar Føroyar eru á listanum, tí jú færri skip, tess størri ávirkan fær ein einkult afturhalding á placeringina á listanum hjá Paris Mou.

Samanumtikið ynskir RFF at vísa á, at tað ikki eru nakrar veruligar grundgevingar fyri aldursmarkinum, og at tað er trupult at síggja, hví júst 20 ára gomul skip gera munin millum seriøs og óseriøs reiðaríir.“

# NORSK SKIP HÁLA FAS NIÐUR

## FAS MÁ IKKI VERÐA KØSTUR

Vilhjálmur Gregoriussen tekur eisini undir við, at aldurin í sær sjálvum ikki altíð merkir verri trygd, ella at skipið er til ampa fyri umhvørvið, og hann er eisini samdur við reiðararnar um, at talið av skipum í FAS hevur stóran týdning fyri støðuna á Paris MoU-listanum.

– Men trupulleikin er, at um FAS hevur ov lagaligar upptøkutreytir, so er vandin fyri, at útlendsk reiðaríir við gomlum, illa riknum skipum gera sær dælt av skipanini og lata seg skráseta her. Tað tænir hvørki FAS ella føroyskari sjóvinnu, um FAS gerst ein køstur fyri vánalig skip, sigur stjórin í Sjóvinnustýrinum.

Hann vísir á, at aldurin á skipunum hevur fingið uppaftur størri týdning, eftir at Paris MoU á nýggjárinum fór at bólka skipini eftir einari nýggjari skipan, New Inspection Regime, NIR. Eftir hesi skipan verða skipini bólkað í „low risk", „standard risk" og „high risk", og her telur tað niður, um skip eru eldri enn 12 ár.

## YNSKI UM LIMASKAP

Tað kann tykjast løgið, at so nógv verður gjørt burtur úr at sleppa á hvíta lista hjá Paris Mou, tá Føroyar als ikki er limur har.

– Har er tað bara so, at vit kunnu ikki seta okkum upp ímóti PSC-eftirlitið í útlendskum havnum, sama um vit eru limir í Paris MoU ella ikki, staðfestir Vilhjálmur Gregoriussen:

Sjálvur hevði hann ynskt, at Føroyar vóru limir í Paris MoU.

– Okkara játtan er tó so avmarkað, at vit hava raðfest annað virksemi hægri enn limaskap í Paris MoU. Vit hava als ikki orku til at gera PSC-eftirlit, og tí er rættiliga avmarkað eftirlit við útlendskum skipum yvirhøvur, sum koma í føroyska havn, sigur stjórin í Sjóvinnustýrinum.

Vilhjálmur Gregoriussen sigur, at ein møguligur føroyskur limaskapur í Paris MoU hevði kostað umleið eina millión krónur um árið.




*Myndin vísir støðuna hjá føroyska flagginum árini 1999-2010. Tá vísitalið í 2000 fór upp um 1, gjørdist tað svart. Fyri at gerast hvítt, skal tað niður um 0. Tað vóna vit verður úrslitið um ársskiftið 2011-2012.*

**Vitjanir um borð og skráseting av viðmerkingum – samanbering 2010-2011**




*Talvan vísir gongdina við havnastatseftirliti (PSC-eftirliti) umborð á føroyskt skrásettum skipum.*

# Samskiftisfólk styrkir FAS skipanina

**Sjóvinnustýrið heldur tað vera umráðandi við trygdini á sjónum, og at Føroyar koma á hvíta listan hjá Paris MoU. Hetta er orsøkin til, at eitt samskiftisfólk, Majbritt Pauladóttir, varð sett í vár til burturav at taka sær av samskiftinum við FAS-reiðaríini.**

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Føroyar skulu á hvíta listan hjá Paris MoU. Tað er greiða málið hjá Sjóvinnustýrinum, sum í vár setti Majbritt Pauladóttir í starv sum samskiftisfólk at taka sær av samskiftinum við reiðaríini í FAS og savna hagtøl frá Paris MoU-vitjanum umborð á skipum teirra.

Majbritt Pauladóttir hevur hollar og drúgvar royndir innan shipping, umframt at hon er cand.mag í enskum máli.

## DRÚGVAR ROYNDIR

Størsta partin av vaksna lívinum hevur hon búð í Noregi. Í sjey ár, frá 1982 til 1989, arbeiddi hon í stóra, norska reiðarínum Ugland Rederierne, og síðani var hon í samfull 22 ár hjá Berghav Management, til hon nú fór í starv hjá Sjóvinnustýrinum. Seinastu 10 árini hjá Berghav Management var hon góðskumenningarleiðari.

– Reiðaríini hava stóra virðing fyri Majbritt, tí hon hevur drúgvar royndir, stóra vitan og veit, hvussu veruleikin sær út teirra megin borðið, staðfestir Vilhjálmur Gregoriussen, stjóri í Sjóvinnustýrinum.

Sjálv heldur hon eisini drúgvu shipping-royndirnar vera til fyrimuns í samskiftinum við reiðaríini. Og júst samskifti, dialogur, er besti mátin at uppstiga reiðaríini, tá tað ræður um sjótrygd og at verja havumhvørvið, heldur hon.

– Eg havi gjørt nógv burtur úr at seta meg í samband við reiðaríini. Eg skrivi til tey og fylgi upp við at



*Majbritt Pauladóttir samskiftir við reiðaríini umvegis teldu og telefon, men hon hevur eisini verið á persónligari vitjan hjá fleiri reiðaríum.*

| Ár | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 0.96 | 1,16 | 0,76 | 0,53 | 0,59 | 0,59 | 0,58 | 0,43 | 0,25 |
| Litava | 0,97 | 1,14 | 0,82 | 0,57 | 0,50 | 0,22 | 0,32 | 0,08 | 0,30 |
| Rusland | 1,65 | 1,37 | 1,04 | 0,67 | 0,38 | 0,32 | 0,18 | 0,22 | -0,17 |
| Kina | 0,02 | -0,18 | -0,55 | -0,61 | -0,67 | -1,00 | -1,23 | -1,60 | -1,75 |
| Isle of Man | 0,14 | -0,46 | -0,68 | -1,30 | -1,38 | -1,55 | -1,56 | -1,47 | -1,51 |
| Marchall Islands | -0,71 | -0,42 | -0,18 | -0,20 | -0,46 | -0,88 | -1,21 | -1,52 | -1,42 |
| Danmark | -0,89 | -0,80 | -1,08 | -0,75 | -0,75 | -0,95 | -1,31 | -1,44 | -1,49 |
| Noregi | -1,01 | -0,90 | -0,90 | -0,82 | -0,87 | -1,04 | -1,37 | -1,43 | -1,35 |

Í yvirlitinum síggja vit, hvussu ávís lond hava verið skrásett á IMO listanum árini 1999-2007.
Tøl yvir 1 siga, at landið er á svartalista, tøl ímillum 0 og 1 siga, at tað er á gráa lista. Er talið undir 0, er landið á hvítalista. Sum vit síggja var støðan hjá føroyska flagginum ikki góð í 2000. Tá vóru vit á svartalista. Síðani hevur tað bara gingið rætta vegin.

ringja til tey, og fleiri havi eg eisini vitjað, sigur Majbritt Pauladóttir.

## VÆL MÓTTIKIN

Og hóast hon umboðar ein eftirlitsmyndugleika, ið ofta setur krøv til reiðaríini, so verður hon altíð væl móttikin.

– Vit møta heldur ikki bara upp fyri at hondhevja okkara myndugleika, men koma eisini, tá reiðaríini bjóða okkum við til tiltøk, eitt nú ráðstevnur. Reiðaríini virðismeta, at vit eisini taka okkum tíð til slíkt, tí tað gera tær stóru skipaskrásetingarnar langt frá altíð, sigur Majbritt Pauladóttir.

Sambært henni er tað ikki gáloysni ella vantandi vilji hjá reiðaríunum, ið er orsøkin til, at Føroyar enn eru á gráa lista hjá Paris MoU.

– Vit skulu minnast til, at samanborið við eitt nú NIS og DIS, so eru fólkini aftanfyri reiðaríini og umborð á skipunum í FAS í nógv størri mun uppskúlaði í fiskivinnuni. Tey hava ikki arbeitt so leingi undir altjóða trygdarreglunum fyri farmaskip og tangaskip, ISM-kotuni (ISM = International Safety Management, red.), og eru í eini upplæringartíð. At skip framhaldandi verða afturhildin ella fáa nógvar viðmerkingar, tá PSC-eftirlit verður gjørt, er tekin um, at upplæringin ikki er komin nóg langt enn, staðfestir Majbritt Pauladóttir.

## TANGASKIP Í VENJING

Hetta er eisini orsøkin til, at norsku reiðaríini í FAS standa seg verri enn tey svensku.

– Ein stórur partur av svenska flotanum í FAS er tangaskip. ISM-kotan kom fleiri ár fyrr í gildi fyri tey enn fyri turrlast-farmaskipini. Harafturat innførdu tangaskipsreiðaríini strong trygdarkrøv, sonevnd vetting-krøv, til teirra egnu skip langt áðrenn ISM-kotan varð orðað. Tískil eru hesi reiðaríini von við at skula fyrihalda seg til strong trygdarkrøv.

– Tað tekur tíð, men reiðaríini við turrlast-farmaskipum í FAS koma eisini í venjing sum frá líður, og eg haldi góð útlit eru fyri, at Føroyar verða á hvíta lista hjá Paris MoU næsta ár, sigur Majbritt Pauladóttir.




Neyðstøður á sjónum krevja ein bjargingarbát, sum er álítandi og skjótur at sleppa í. Tíðin er avgerandi, og fullkomilig vissa má vera fyri, at báturin virkar. Fyrstu ferð.

Set títt álit á eitt gott merki og eina ábyrgdarfulla tænastu. Fønix umboðar viðurkendu bjargingarbátarnar RFD og DSB, ið fáast til bátar og størri skip. Og Fønix er góðkent at veita tænastu og eftirlit, ið livir upp til øll krøv.

Fønix - á Hjalla, Hoyvík - Tel. 31 16 31 - www.fonix.fo

Fønix
Tryggleiki til heimið, virkið og skipið

# Gráa flaggið um at gerast hvítt

Tekniskt er føroyska skipaskrásetingin nú á hvítalista, men listin verður bara endurskoðaður einaferð um árið og tað er á nýggjárinum, so tað er ikki formliga góðkent enn. Men tað er ikki heilt semja um, hvussu stóran týdning, vit skulu leggja í hetta

*Eftir: Áka Bertholdsen*

Fyri nøkrum árum síðani var føroyska flaggið misteinkiliga nær við aftur at enda á svartalista. Sí talvu á s. 6. Síðani er eitt stórt arbeiði gjørt fyri at bøta um støðuna.

Síani 2011 hava vit verið á gráa lista og hendir onki óvæntað, tað, ið eftir er av árinum, kemur føroyska flaggið helst á hvítalista á nýggjárinum.

Men ikki øll eru heilt samd við teimum, sum tvíhalda um, hvussu stóran týdning tað hevur, at tað føroyska flaggið er hvítt.

## ANFINN V. HANSEN

Anfinn V. Hansen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, RFF. Hann heldur, at tað er ongin orsøk til at gera ov nógv av.

Sjálvandi hevur tað ein týdning, at vit koma á hvítalista, men týdningurin skal heldur ikki yvirmetast, sigur hann.

Hinvegin ásannar hann, at koma vit aftur á svartalista, so verður tað ein vanlukka.

– ES vil ikki so frægt sum hava skip á svartalista inn í sínar havnir!

Men í løtuni eru vit ovarliga á gráa listan.

Hvar vit liggja á listanum vísir, hvussu væl vit hava klárað okkum í eftirlitinum (Port State Control), yvir eitt longri áramál.

– Standa vit á hvítalista, er tað eitt prógv um, at vit standa okkum væl og, at skipini eru í góðum standi og at vit hava ordan í skipsskjølunum.

– Standa vit á gráalista, standa vit okkum hinvegin ikki heilt so væl.

## TÝDNING FYRI OKKUM SUM TJÓÐ

Anfinn V. Hansen sigur, at sjálvandi hevur tað ein ávísan týdning fyri okkum sum tjóð, at vit eru á hvítalista, tí tað er eitt gott sølu-argument fyri okkara skip og okkara flagg.

Tað er góð reklama og góð reklama er altíð góð.

Tað kann eisini vera ein fyrimunur í royndunum at lokka fleiri skip undir okkara flagg, tí kappingin ímillum londini um skipini, er hørð.

Hinvegin heldur hann ikki, at nakar velur okkara skipaskrá frá, bara tí at vit eru á gráa lista.



*Anfinn V. Hansen*

– Liggja vit soleiðis fyri á gráa lista, at vit eru á veg niður á svartalista, fær tað sjálvandi týdning.

– Men vit liggja soleiðis fyri á gráa lista, at vit eru á veg upp á hvítalista, og tá hevur tað avmarkaðan týdning.

– Hvar vit eru á listanum, er prógv fyri umheiminum, at vit hava okkara viðurskifti í rættlag.

Men fyri tann einstaka reiðaran hevur tað ikki so øgiliga stóran týdning, tí tað einasta, hann skal hava í huga er at syrgja fyri, at hann sjálvur hevur øll síni viðurskifti í rættlag.

Hinvegin verða skip á hvítalista ikki kannað so ofta, sum skip á gráa lista, fyri ikki um at tala um skip á svartalista.

## TAÐ KANN KOSTA PENING

– Tað tekur bæði tíð og orku frá manningini, so sjálvandi er tað ein bági og verður skipið afturhildið, kostar tað sjálvandi eisini pening.

Anfinn V. Hansen staðfestir eisini, at hvat føroyska flagginum viðvíkur, gevur flaggliturin ikki eina heilt rættvísa mynd av støðuni.

– Í eini lítlari skipaskrá, sum okkara, skal lítið til, at vit fara upp eftir ella niðureftir á listanum.

– Eitt einstakt mistak á einum skipi, kann skjótt ávirka allan flotan. Flaggliturin gevur sostatt ikki neyðturviliga altíð eina rætta mynd av, hvar vit flóta.

Formaðurin í RFF staðfestir, at vit hava ikki so frægt um Port State Control í Føroyum, so vit gera ikki okkara egna eftirlit, tó at hann ikki

dugir at siga um tað hevði havt nakran týdning fyri hagtølini.



Tommy Petersen

## TOMMY PETERSEN

Tommy Petersen, stjóri á føroysku altjóða skipaskránni, FAS, er ikki samdur.

Hann heldur, at tað hevur avgerandi týdning, at vit eru á hvítalista.

Í veruleikanum eru vit longu á hvítalista, men listin verður bara dagførdur einaferð um árið og tað er á nýggjárinum.

– Tí eru vit ikki formliga komin á listan enn, men tekniskt sæð eru vit longu á listanum.

Hendir onki óvæntað tað ið eftir er av árinum, koma vit formliga á hvítalista á nýggjárinum, sigur Tommy Petersen.

– Í 2000 vóru vit á svartalista, men hesi seinastu árini hevur Skipaeftirlitið gjørt ein rættiligan vørr fyri at fáa skipini upp a hægri stig.

– Tí eru føroysk reiðarí nógv meiri tilvitað um støðuna og stremba eftir at hava viðurskiftini í rættlag.

Tommy Petersen sigur, at tað hevur stóran týdning fyri tann einstaka reiðaran, at vit eru á hvítalista, tí tá er tað nógv lættari at fáa charter til skipini.

– Tá ið skip verða charta verður tað viðhvørt kravt, at skipið er í eini skipaskrá, sum er á hvítalista, so víst hevur tað týdning.

## TAÐ ER EIN SØLUVØRA

– At vit eru á hvítalista vísir umheiminum, at vit hava viðurskiftini í rættlag og fyri okkum sum skipaskrá er tað púra vist ein søluvøra, at vit kunnu vísa á, at vit eru á hvítalista.

Stjórin í FAS sigur, at ES hevur sett meiri umfatandi og betri skipað eftirlit. Og tað er heilt greitt, at skip, sum eru á svarta- ella gráa lista, eru nógv oftari fyri eftirliti enn skip á hvítalista.

Og tað er eisini greitt, at skip, sum eru í eini skipaskrá, sum er á svartalista ella gráalista, og tískil verða kannað ofta, er tað ein vansi, sum eisini kostar pening og tí hevur tað týdning.

Tommy leggur afturat, at tað gongur tann rætta vegin, í løtuni eru umleið 65 skip í FAS, og nógv bendir á at vit í vár koma upp á 50. Tað vil styrkja okkara støðu munandi.



Gunnbjørn Joensen

## GUNNBJØRN JOENSEN: HETTA HEVUR STÓRAN TÝDNING

Gunnbjørn Joensen á Thor í Hósvík, er samdur við Tommy Petersen í, at tað hevur stóran týdning at fáa føroyska flaggið á hvítalista.

Ikki minst heldur hann, at tað hevur týdning fyri royndirnar at fáa fleiri skip at skráseta seg í Føroyum.

– Tað er ongin ivi um, at tað verður torført at fáa skip, sum eru undir hvítum flaggi, at skráseta seg í eini skipaskrá, sum er undir gráum flaggi.

– Okkara skipaskrá skal vera lokkandi, men tað verður ikki lætt at lokka skip, sum eru undir hvítum flaggi, upp í okkara skipaskrá, eru vit ikki eisini á hvítalista.

Hann nevnir eisini, at skipini, sum ikki eru á hvítalista, eru nógv oftari fyri eftirliti enn skipini á hvítalista.

– Men hinvegin kann ov lítið eftirlit eisini elva til líkasælu, so tað er at hava eina góða javnvág.

## VIT EIGA EISINI AT GERA PORT STATE CONTROL

Tí heldur Gunnbjørn Joensen, at tað, vit fyrst og fremst eiga at gera, er, at vit eisini sjálvi gera Port State Control í føroyskum havnum av føroyskum skipum.

– Men so langt eru vit tíverri ikki komin enn og tað er tann stóri feilurin.

Hann hugsar serliga um skip, ið sigla nógv innanoyggja, men gera einstakar túrar uttanlands.

Summi av hesum skipum og útgerðarfeløgum eru als ikki fyrireikað upp á at fáa eftirlit umborð og tað kann verða ein stórur vansi, tí tey kunnu skjótt fáa nógvar krossar.

– Hetta er ein stórur vansi fyri okkara skipaskrá, tí hon er so lítil, at verður eitt skip kannað og fær krossar, telur tað so nógv niðureftir, tí hvørt einstakt skip er ein so stórur prosentpartur av flotanum.

– Tað er verri enn so altíð skipinum, tað er galið við. Tað er líka ofta onkur pappír, sum ikki eru heilt í lagi, men tað gevur eisini minus í karakterbókina.

– Hevði eftirlit verið í Føroyum, høvdu vit vant útgerðarfeløg til at havt viðurskiftini í rættlag, sigur Gunnbjørn Joensen.

# QUALITY SALMON
## FROM THE NORTH ATLANTIC









Bakkafrost is the leading Faroese producer and exporter of quality salmon. We offer a wide range of salmon products produced by our own processing facilities. Because we manage the entire production process from salmon roe to ready-packed products, Bakkafrost is a reliable partner, able to continuously deliver on long-term contracts and consistently provide stable supply of salmon products.

Situated in the Faroe Islands in the heart of the North Atlantic Current and the ice-cold waters of the North Atlantic Ocean, Bakkafrost is located in the prime spot to produce distinctive salmon products.

BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968

Bakkavegur 9 · FO-625 Glyvrar · Faroe Islands · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09 · bakkafrost@bakkafrost.com · www.bakkafrost.com

www.sansir.fo

# Skeiðskema 2011



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | aug. | sept. | okt. | nov. | des. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA AUTOMATIC RADAR PLOTTING AIDS | 4 | 8.900 | | | 3 | 21 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC GENERAL OPERATOR CERTIFICATE (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC GENERAL OPERATØR CERTIFICATE, RENEWAL OF COURSE | 7 | 7.000 | | | | 28 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE | 7 | 8.900 | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE, WITH INMARSAT | 8 | 9.950 | | | | 28 | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>TANKERS SAFETY, SPECIAL COURSE FOR OIL-, GAS- AND CHEMICAL TANKERS | 5 | 6.800 | | 26 | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>TRANSPORT OF DANGEROUS GOODS IN DRY CARGO SHIPS | 3 | 5.400 | | 5 | | 14 | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY | 4 | 7.500 | | | 03<br>24 | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra). um prógvið er eldri enn 10 ár<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY<br>WHEN CERTIFICATE IS OLDER THAN 10 YEARS | 10 | 12.000 | | | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>COURSE IN ELEKTRONIC CART DISPLAY INDICATION SYSTEM | 4 | 8.900 | | 12 | 31 | | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>RENEWAL OF MARITIME TRAINING CERTIFICATE | pr. dag | 1.500 | | | | 7 | |
| 12 | SSO-skeið<br>COURSE FOR SHIP SECURITY OFFICERS | 3 | 5.400 | | 19 | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>WORKING ENVIRONMENT §16-COURSE | 4 | 5.800 | | | 17 | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið. Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>COURSE AS BOLIER TENDER | 5 | 7.500 | | | | 4 | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>FIRE FIGHTING ON BOARD SHIPS | 3 | 5.650 | 29 | 19 | 03<br>31 | 21 | 12 |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>REFRESHER COURSE IN FIRE FIGHTING | 1 | 2.900 | 11 | 01<br>29 | 31 | 03<br>24 | 15 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi. STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING | 2 | 4.100 | | | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 9.750 | 01<br>08<br>15<br>22 | | | | 05 |
| 19 | Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil. STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 8.650 | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | 17 | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking. (Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | | | |
| 25 | Grundleggjandi trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 3 | 4.550 | | | | | |
| 26 | Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 6 | 10.260 | | | | | |
| 27 | Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1<br>PROFICIENSY IN SERVIVAL CRAFT AND RESCUE BOATS | 4 | 4.700 | | 22 | | | |
| 28 | Medisinsk fyrstahjálp. STCW A-VI/4-1<br>MEDICAL FIRST AID | 4 | 6.000 | | | | | |
| 29 | Maritime Legislation. e-learning (Sign up on www.vh.fo)<br>FØROYSK SJÓVINNULÓG. E-LEARNING | | 5.000 | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA · TEL 60 80 80

## Kári P. Højgaard:

# Vit mugu hava somu sømdir



### SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN:

Tá inntøkumøguleikarnir í farnu øld sviku her heima, leitaðu føroyskir fiskimenn í stórum tali til Íslands og Grønlands at vinna sær og sínum til lívsins uppihald. Tað er burturvið at hugsa sær, at føroyskir fiskimenn ikki fara at gagnnýta møguleikarnar í grannalondunum, um umstøðurnar eru munandi betur har enn heima, fyri at fáa eina góða inntøku.

Skattafrádrátturin kom av teirri orsøk, at t.d. norðmenn bjóðaðu nógv betri sømdir, tí varð neyðugt at geva sjómonnum javnari kappingartreytir.

– Vit fingu sjómannafrádráttin uppá 15% upp til kr. 500.000 ella 75.00 um árið. Hetta átak hjálpti til, aftur at fáa fólk umborð á skipini.

Vit hava ikki megnað at fylgt við, og hava lækkað frádráttin niður í 14% ella 68.000 kr. um árið. Norðmenn hava hinvegin hækkað frádráttin, samstundis sum sjómenn hava betri sømdir og frítíð í Noreg.

### FØROYINGAR Í HÓPATALI

Tí síggja vit, at føroyingar í hópatali fara við norskum skipum, meðan sera trupult er at manna nógv av okkara egnu skipum.

Seinastu tíðina eru eisini nógvar skyldur álagdar vinnuni, sum minka um inntøkurnar hjá sjófólki. Trygdargrunnurin er m.a. lagdur út til vinnuna sjálva at gjalda.

Fiskimaðurin man verða tann samfelagsbólkur, sum hevur merkt størstu skerjingarnar í inntøku. Ein tann størsta avbjóðingin í Føroyum, verður at varðveita eitt burðardygt veiðulið av dugnaligum sjófólki, sum hevur vunnið sær servitan á økinum.

Tí meti eg tað verða óhugsandi, at sjómannafrádrátturin, sum kom í gildið í 1998, verður avtikin, fyrr enn umstøðurnar hjá sjómonnum eru betraðar tilsvarandi.

### FAS SKIPANIN

Sjálvstýrisflokkurin heldur tað vera týdningarmikið, at vit kunna bjóða okkum fram í altjóða kapping við onnur lond. Vit marknaðarføra FAS-skipanina sum ein alternativan inntøkumøguleika, ið skal verða eitt annað fíggjarligt bein at standa á.

Undir føroyskum flaggi skulu vit hava skipaði viðurskifti, tað verið seg trygd á sjónum, skipaði viðurskifti, virðing av mannarættindum til mannsømilig kor og løn.

### DIS SKIPANIN

Viðvíkjandi DIS er støðan hjá flokkinum tann, at lønmóttakarin hevur tikið av tilboðnum um eina netto løn, sum hann/hon er nøgd/ur við. Skatturin fer sum stuðul til reiðaríið, ístaðin fyri til land og kommunur. Talan er um altjóða skráseting. Her ber ikki til at arbeiða í sjálvdrátti, tí má málið greiðast í semju og avtalu millum londini.

### FØROYSKIR SÁTTMÁLAR SKULU GALDA

Sjálvsagt skula føroyskir sáttmálar galda umborð á føroyskum fiskiskipum og skipum undir føroyskum flaggi. Sjálvstýrisflokkurin heldur, at tað er átaluvert, um útlendsk arbeiðsmegi verður nýtt, fyri nógv lægri løn, enn tann avtalaða sáttmálabundna lønin á økinum ásetir. Um útlendingar eru partar av manningini skulu teir sjálvsagt hava somu kor sum føroyingar.

# Høgni Hoydal: Skapa somu treytir til vinnu og samfelagsbólkar



Viðurskiftini hjá sjófólki í fiski- og skipavinnu sum heild, er eitt afturvendandi stríðsmál í føroyskum politikki og í føroyska almenninginum. Tjóðveldi fær javnan ákoyringar fyri síni sjónarmið um hesi viðurskifti. Og tað er væl skilligt, tí hetta snýr seg um inntøkugrundarlag hjá so nógvum húsarhaldum og um vinnukarmarnar hjá týdningarmiklum vinnum. Tjóðveldi hevur m.a. hesi politisku mál viðvíkjandi ymsum serskipanum í vinnuni.

## SJÓMANNAFRÁDRÁTTUR

Tjóðveldi hevur tað grundsjónarmið, at vit ikki eiga at gera serskattaskipanir fyri ávísar partar av vinnuni. Vit eiga at skipa somu treytir fyri vinnur og samfelagsbólkar. Sjómannadrádrátturin hevur eisini havt ta avleiðing, at hýrusáttmálar og onnur týdningarmikil sáttmálaviðurskifti hjá sjómonnum, ikki eru dagførd sum tey áttu millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Tá ið frádrátturin er settur í verk og hevur virkað, er politiska uppgávan hjá okkum at finna loysnir og broytingar, sum ikki taka grundarlagið undan hýruviðurskiftunum hjá tí einstaka sjómanninum, men sum kunnu javnseta vinnur og samfelagsbólkar í Føroyum. Tí hevur Tjóðveldi arbeitt við tveimum uppskotum, ið kunnu røkka hesum máli:

1. At vit heldur enn at hava sjómannafrádrátt, gera eina generella skipan viðvíkjandi frádráttum hjá fólki, ið hava sítt dagliga arbeiðspláss burturi frá føroyska samfelagnum. Tað vildi merkt, at allar vinnur og samfelagsbólkar vórðu javnsett og undir somu treytum.
2. At sjómannafrádrátturin verður umlagdur og kann partvíst nýtast í eini skiftistíð í sambandi við eina nýggja pensjónsskipan. Tí tað er alneyðugt, at fiskimenn fáa eina veruliga pensjónsskipan, ið hevur verið forsømd í alt ov mong ár av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

## FAS-SKIPANIN

Tjóðveldið hevur ta støðu til FAS-skipanina, at hon er ein roynd at skapa eina kappingarføra skipan mótvegis øðrum altjóða skipaskrásetingum. Tí tók Tjóðveldi í landsstýrinum í 2008 stig til at gera skipanina meira kappingarføra, og tað er framvegis okkara málsetnignur.

## DIS OG NIS-SKIPANIRNAR

Tjóðveldið ásannar, at hesar skipanir eru gjørdar av okkara grannalondum og at nógvir føroyskir sjómenn sigla undir teimum og hava sín bústað í Føroyum. Tað er sjálvandi ein stórur trupulleiki, at eitt stórt tal av fólki ikki rindar beinleiðis skatt í Føroyum, og serliga skattainntøkurnar hjá ávísum kommununum, eru sera nógv merktar av tí. Ein háttur at gera nakað við tað, er at taka táttin uppaftur í okkara dupultskatta-avtalum við Danmark og Noreg, tí tað endurgjaldið, ið verður veitt donskum og norskum kommunum í sambandi við DIS og NIS, er dottið burturímillum, tá ræður um føroysku kommunurnar (her var illa samráðst frá føroyskum myndugleikum í síni tíð). Hetta kann tó gerast trupult at fremja. Hitt, ið vit noyðast at gera, er at tryggja, at DIS'arar og NIS'arar gjalda gjøld til týdningarmiklar samfelagstænastur, so sum heilsutrygdargjald, kringvarpsgjald, barsilsgjald o.a., tá ið tey væntandi verða løgd inn yvir skattaskipanina.

## ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI Á FØROYSKUM SKIPUM

Tjóðveldi tekur als ikki undir við, at útlendingar sum virka í føroysku vinnuni hava aðrar lønartreytir enn føroyskir sáttmálar áseta. Hetta krav varð eisini sett fram í sambandi við makrelfiskiskapin fyri 2011 – tó at vit tíverri ikki fingu framt kravið í sambandi við móttøkuskip.

# Jørgen Niclasen: Sjófólkainntøkur gull verdar



Tað var við Anfinni Kalsberg sum fíggjarmálaráðharra, at vit fingu gjøgnumført sjómannafrádráttin. Hesin var neyðugur fyri, at sjófólk ikki skuldu flyta av landinum. Kritikkurin hevur verið stórur, men vit halda framvegis, at hesin er góður og gagnligur fyri føroyska samfelagið. Vit mugu hava skipanir, sum halda okkara besta sjófólk í landinum.

## FRÁDRÁTTUR FYRI AT VERA BURTUR FRÁ FAMILJU

Okkara skattaskipan er uppbygd við, at fólk, sum arbeiða langt frá síni familju fáa frádrátt. Um vit hava langt at koyra til arbeiðis, so fáa vit koyrifrádrátt. Arbeiða vit á aðrari oyggj, og mugu hava annað stað at búgva í, í arbeiðsvikuni, fáa vit frádrátt fyri dupult húsarhald. Um vit ferðast í útlandinum fyri tað almenna ella fyri fyritøku, fáa vit skattafrían dagpening, einar 400 kr., skattafrítt um dagin. Um vit eru við fiskiskipi, og eru burtur frá heiminum, í minsta lagi helvtina av árinum, fáa vit sjómannafrádrátt. Hægsti sjómannafrádráttur er lægri enn 400 kr. um dagin.

Hetta eru skipanir, sum eru rímiligar og gagnligar. Tær eru neyðugar fyri at fólk kunnu trívast í landinum. At vera burtur frá familju og samfelagságóðum stóran part av árinum skal løna seg.

## DIS GEVUR OKKUM INNTØKUR

Nøkur ár eru liðin síðani DIS-skipanin kom í gildi. Tá valdi danska stjórnin at gera avtalu við donsku reiðaríini um, at lønirnar fóru niður í helvt, og afturfyri skuldi manningin verða skattafrí. Við øðrum orðum, at reiðaríið skuldi fáa skattin. Tá kundu Føroyar sagt nei, men so var úrslitið, at føroyingar antin mistu starvið ella vóru noyddir at flyta av landinum.

Føroyar gingu tí við til at vera við í skipanini og lata skattin fara. Vit fingu jú peningin inn í landið. Pening, sum gevur avgjøld, MVG, brúkaragjøld osfr. Vit kunnu ikki lasta sjómenn fyri hesa avtalu við donsku stjórnina. Teir mistu framvegis helvtina av lønini. Skal nakað broytast her, so er tað eitt endurgjald frá danska statinum fyri mista skattainntøku.

## FAS GEVUR MØGULEIKAR

FAS-skipanin er í dag ein skipan, sum fleiri og fleiri skip verða skrásett í. Tað gevur inntøkur til landið og tað gevur eisini arbeiðsmøguleikar fyri føroysk sjófólk. Harmiligt at løgtingið ikki frá fyrsta degi vildi gera skipanina áhugaverda at skráseta skip í. Hetta er í dag ein føroysk skráseting í vøkstri. Fleiri og fleiri skip vera skrásett og inntøkurnar kvinka uppeftir. Vit hava brúk fyri inntøkunum og arbeiðsmøguleikunum við skipanini. FAS-skipanin tykist nú at vera tað hon skuldi verið frá byrjan.

Føroyingar sigla við skipum hjá mongum øðrum tjóðum. Um onnur skulu sigla við okkara skipum er umráðandi, at tað er undir skipaðum viðurskiftum, har aðalmálið má vera, at okkara fólk hava besta møguleikan.

FAS, DIS og sjómannafrádráttur eru gagnlig. Síggi tó ein trupulleika í háttinum vit skatta sjófólk, sum sigla undir øðrum enn frammanundan umtalaðu skipanum.

Summi sjófólk fáa skattarokning fyri flogferðaseðlar til og frá mynstring. At mynstra í New York kostar meira í skatti enn at mynstra í Reykjavík. Eisini eru sjófólk, sum mugu rinda skatt av pensjónsuppsparing. Hetta sleppa øll, sum arbeiða á klettunum undan. Fólkaflokkurin vil gera broytingar, sum stilla hesi líka við onnur. Broytingar, sum framhaldandi fáa hesi at koma við peningi til land og fólk okkara.

Uttan inntøkur, eingin vælferð. Uttan vælferð, einki samfelag.

## SKIPAÐI VIÐURSKIFTI

Føroyingar sigla við skipum hjá mongum øðrum tjóðum. Um onnur skulu sigla við okkara skipum er umráðandi, at tað er undir skipaðum viðurskiftum, har aðalmálið má vera, at okkara fólk hava besta møguleikan.

# Poul Michelsen:
# Studningur skal úr føroyskari fiskivinnu



Framsókn ætlar, at allur studningur skal úr føroyskari fiskivinnu.

Vit eru samanumtikið ímóti stuðli til vinnu.

Tó skal atlit takast til:

A. Nýggjar vinnur.
B. Um onnur lond og marknaðir hava studningsskipanir (skattafrádrátt) sum avlagar kappingina mótvegis føroyskari framleiðslu.
C. Gransking og íverksetarar.

### VILJA VARÐVEITA FAS

Vit vilja varðveita FAS-skipanina og tryggja at hon altíð er kappingarfør við aðrar líknandi skipanir hjá londunum kring okkum.

### DIS-SKIPANIN HALDA FRAM

Vit vilja, at DIS skipanin heldur fram. Vilja tó kanna um okkurt betri býti kann gerast millum Danmark og Føroyar, men hetta rakar ikki herbúgvandi sjómenn.

### ÚTLENDINGAR Á FØROYSKUM SKIPUM

Øll fiskiveiða í føroyskum sjógvi skal fiskast av føroyskum skrásettum skipum, og øll manning skal vera føroysk, og við føroyskum sáttmálum.

Vit mugu tó halda alheimsgaldandi reglur um mark fyri, hvat er føroyskur sjógvur og hvat er alheimssjógvur.

# Kaj Leo Holm Johannesen:
# Føroyskir sáttmálar skulu galda

Umstøðurnar hjá manningini á føroyskum skipum, hvussu lønarviðurskiftini og skattligu viðurskiftini eru hava týdning, tá føroyska fiskivinnan kappast um arbeiðsmegina mótvegis útlendskum reiðaríum. Hesi viðurskiftini hava eisini týdning fyri kappingina millum ymsu vinnugreinarnar í Føroyum.

Tá støða skal takast til verandi sjómannafrádrátt og møguligar broytingar í honum, mugu atlit takast til, hvørjar sømdir sjómenn fáa í øðrum londum, men eisini, at ein møguligur sjómannafrádráttur ikki kennist ov kappingaravlagandi mótvegis øðrum vinnum í Føroyum.

### VILJA HAVA GÓÐSKU

Eftir at broytingar eru gjørdar í FAS-skipanini, bæði tá tað snýr seg um skattligu viðurskiftini og fyri at gera skránna til eina góðskuskipaskrá, hevur gingist væl at fáa skip at skráseta seg í FAS.

Nú tað eftir øllum at døma hevur eydnast at gera skipanina kappingarføra – eisini í dygd – verður nú farið undir eitt skipað arbeiði at fáa reiðarí at seta seg niður í Føroyum og at reka skip síni hiðani.

Eydnast tað á henda hátt at uppbyggja eina týðandi føroyska sjóvinnu fara vit at fáa stóra virðisskapan í føroyska samfelagnum av hesi nýggju vinnugreinini.

### VIT MUGU FYLGJA VIÐ

DIS, FAS og NIS eru alt altjóða skipaskráir, ið eru karmar kring altjóða skiparakstur. Vit mugu alla tíðina fylgja við, hvussu skipanirnar í øðrum londum laga seg í mun til okkara egnu.

### FØROYSKIR SÁTTMÁLAR SKULU GALDA

Vit eiga at hava fyri eyga, at mest møgulig virðisskapan stendst av at veiða og virka fisk, ið verður veiddur av skipum undir føroyskum flaggi, og sum hava føroyskt fiskiloyvi. Í hesum sambandi eiga vit sum útgangsstøði at seta sum treyt, at sáttmálarnir á føroysku arbeiðsmarknaðinum skulu galda umborð á umrøddu skipum.

## Jenis av Rana:

# Vit stuðla føroysku sjóvinnuni



Miðflokkurin var ikki við til at samtykkja sjómannafrádráttin, sum í upprunalíki sínum onki ovasta mark hevði fyri rætt til frádrátt. Hinvegin var tað núverandi løgtingsmaður Miðfloksins, táverandi fíggjarmálaráðharrin, Karstin Hansen, sum í 2000 setti tað ovasta markið, sum síðani hevur forðað fyri, at frádráttur verður latin fyri inntøkur hægri enn 500.000. Onnur broyting, ið eisini er gjørd, er, at % talið er lækkað frá 15 til 14. Eisini eru aðrir frádráttir, sum sjófólk okkara hevði, m.a. samskiftisstuðulin, tiknir av.

Miðflokkurin var sum nevnt ikki millum teirra, ið settu hendan frádrátt í verk, og flokkurin hevur heldur ongar ætlanir um at vera við at taka hendan av. Talan er um ein frádrátt, hvørs endamál er at lætta um hjá teimum, sum hava starv sítt á sjónum, og tí ikki hava somu atgongd til teir ágóðar, sum aðrir samfelagsbólkar annars dagliga njóta.

### FAS-SKIPANIN

Tá FAS skipanin varð sett í gildi í Føroyum, varð talan um eina neyðloysn, so Føroyar kundu verða við og ikki glíða burtur ímillum aðrar tjóðir, sum longu høvdu slíkar skipanir. Varð FAS skipanin ikki gjøgnumførd, varð vandi fyri, at vit mistu skip okkara til hesar skipanir. Við at fáa okkum slíka skipan, gjørdust vit før fyri at kappast á jøvnum føti við aðrar tjóðir um heimsins skip, og eftir øllum at døma hava vit staðið okkum væl higartil.

Óivað eru fleiri hugsanir um hesa skipan, og tíðin man vera komin til bæði at eftirmeta, endurskoða og kanska dagføra hesa.

### DANMARK OG NORRA

DIS, NIS og aðrar líknandi skipanir eru uttan fyri okkara avgerðarøki. Sum nevnt omanfyri høvdu hesar við sær, at neyðugt varð hjá Føroyum at gera sína egnu skipan, FAS skipanina, fyri at kunna verða við í kappingini at fáa skip undir føroyskt flagg og ikki missa okkara egnu til aðrar tjóðir.

### SKIPAÐIR SÁTTMÁLAR

Miðflokkurin metir tað verða grundleggjandi, at øll, sum virka í Føroyum ella á føroyskum kjøli, eru skipaði eftir sáttmálum, sum eru galdandi her á landi. Her er talan um eitt grundleggjandi sjónarmið, sum eisini hevur við trygd teirra, sum her búgva ella virka at gera. Tað má ikki henda, at vit, við at loyva øðrum lønartreytum enn okkara egnu, rætta hond til lond, sum kanska ikki veita fólki sínum eina virðiliga løn.

Júst í hesum døgum hava vit verið vitni til, at útlendsk fiskiskip liggja á føroyskum grunnum og virka føroyskan fisk við útlendingum, hvørs umstøður umborð og inntøkur eru langt frá tí, sum vit her á landi meta vera rætt. Tað er ikki klæðiligt fyri okkum sum tjóð, og vit eiga ikki at opna fyri hesum møguleika.

# Aksel V. Johannesen:
# Nýtt skatta-nýskipanaruppskot



Ymsir frádráttir eru í skattinum, og Javnaðarflokkurin tekur í hvørjum einstøkum føri støðu til slíkar frádráttir. Tað er ein vansi við verandi skipan við sjómannafrádrátti, at høgar inntøkur fáa størri frádrátt enn lágar inntøkur.

Grundgevingina, at sjófólk ikki í líka stóran mun njóta gott av teimum ágóðum, sum samfelagið bjóðar tekur flokkurin undir við. Men við hesi somu grundgeving eigur frádrátturin helst heldur at vera skal givin sum ein frádráttur pr. dag.

Javnaðarflokkurin fer áðrenn valið at leggja fram eitt uppskot um skattanýskipan. Sambært hesum uppskoti verður sjómannafrádrátturin ikki broyttur.

### FAS SKIPANIN

Javnaðarflokkurin var við til at samtykkja at seta FAS í verk. Flokkurin hevur ikki ætlanir um at broyta sjálva FAS-skipanina.

Í sambandi við viðgerð av uppskoti floksins til skattanýskipan hevur verið umrøtt, at føroyingar undir FAS eiga at skattast á sama hátt sum føroyskir fiskimenn, og ikki sum nú, at øll rinda sama prosentpart í skatti. Broytingin, sum varð gjørd í FAS-skipanini, har øll rinda sama prosentpart, hevði ta óhepnu avleiðing, at høgu lønirnar komu at rinda lægri skatt enn áður, meðan lægri lønirnar komu at rinda hægri skatt enn áður. Javnaðarflokkurin hevur ongar ætlanir um at broyta afturberingin til reiðaríini í FAS.

### EITT NÝTT TRYGGINGARGJALD

Javnaðarflokkurin tekur undir við at føroyingar skulu hava møguleika at sigla undir DIS. Føroyingar, sum sigla undir DIS rinda í dag ávís gjøld (AMEG, Heilsutrygd og Kringvarpsgjald) til føroyska samfelagið, men ikki skatt. Tað er ein partur av skattanýskipanaruppskoti floksins, at tey gjøld, sum føroyingar undir DIS skulu gjalda, skulu savnast í eitt nýtt tryggingargjald, sum allir føroyingar eisini skulu gjalda.

### GALDANDI SÁTTMÁLAR SKULU HALDAST

Sambært grein 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap er livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, er ogn Føroya fólks.

Tað hevur verið og fer at vera ein altavgerandi treyt hjá Javnaðarflokkin, at skip, sum sleppa at fiska fólksins ogn, skulu altíð fylgja galdandi sáttmálum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.



# Fá alt við umborð

**Við SjóNeti fáa føroysk fiskiskip breiðband, ið tryggjar bestu ferð á sjónum.**

Nú setir Føroya Tele fulla ferð á internetið til føroysk fiskiskip við at bjóða breiðband heilt út á 60-70 fjórðingar. Tað merkir skjótt og nýmótans samskifti gjøgnum eitt nú teldupost, vanligt internet og sms.

Sambandið millum brúgv og reiðarí verður tí munandi betri, og skipið kann gera sítt egna net, so at øll manningin kann vera online við síni kæru, tá stundir gevast. Tað skapar trivnað og kappingarfyrimunir.

**Tekna hald**
Vilja tit hava SjóNet og fáa alt við umborð, setið tykkum so í samband við tykkara ráðgeva á vinnudeildini á 30 33 70. Vit vegleiða fegin um tykkara møguleikar. Til ber eisini at lesa meira á www.ft.fo/vinna.

**Um SjóNet**
SjóNet er langtrøkkandi internet frá Føroya Tele til skip undir Føroyum. Tað gevur upp til 7 Mbit breiðband og røkkur 60-70 fjórðingar úr landi. Íseting og útgerð er ikki partur av haldinum, men vit ráðgeva um hesar tænastur eisini.




**SjóNet**

| Hald | Ferð | Nýtsla | Mðr.gjald kr. |
|---|---|---|---|
| SjóNet lítið | Upp til 2 Mbit/s | 3 GB | **299** |
| SjóNet vanligt | Upp til 5 Mbit/s | 15 GB | **1.299** |
| SjóNet stórt | Upp til 7 Mbit/s | 60 GB | **3.999** |

Allir prísir eru uttan mvg. Les annars um treytir á www.ft.fo/vinna.

**Okkara samstarv við vinnuna er breitt**

Føroya Tele gongur altíð á odda við vinnuligum kt-tænastum, sum geva tínari fyritøku møguleika at vinna. Hitt tín vinnuráðgeva á 30 33 70.

FØROYA TELE

# Komandi maskinmeistaraútbúgving



*Hans Johannes á Brúgv:*

Tað vísir seg at vera semja um, at maskinmeistaraútbúgvingin skal uppstigast, soleiðis, at liðugt útbúnir maskinmeistarar kunnu halda fram við hægri lestri, um teir ynskja tað. Útbúgvingarráðið og Maskinmeistarafelagið taka undir við hesi ætlan. Undirritaði situr í arbeiðsbólkinum, sum ger uppskot til nýggja kunngerð um útbúgving av skipsførarum og maskinmeistarum. Nýggja kunngerðin leggur upp til at broyta maskinmeistaraútbúgvingina soleiðis, at tá maskinmeistarin er liðugur við sína útbúgving er hann á bachelorstøði. (heiti er enn ikki ásett).

## UPPTØKUKRØV

Lagt er upp til, at: treytin fyri upptøku er lokin yrkisútbúgving, gymnasial útbúgving ella útbúgving við í minsta lagi teimum lærugreinum og stigum, ið eru nevnd niðanfyri:
Støddfrøði B – 250 t
Alisfrøðið B – 200 t
Enskt B – 200 t
Evnafrøðið C – 75 t
Føroyskt C – 105 t

## VERKSTAÐARSKÚLI

Hetta merkir, at fyri tann, sum hevur miðnámsútbúgving verður neyðugt at fara á verkstaðarskúla.

Eftir hetta kann hann/hon fara beinleiðis inn á maskinmeistaraútbúgvingina.

Fyri tann núverandi næmingin, sum í dag vanliga verður upptikin á Vinnuháskúlan, verður broytingin, at hann/hon skal hava omanfyri nevndu lærugreinir.

Hetta verður væntandi skipað sum „atkomuskeið“, og longdin er eitt ár. Tá tann lesandi hevur staðið hesar lærugreinir er hann/hon klárur at koma inn á maskinmeistaraútbúgvingina.

## SAMBÆRT STCW KRØVUM

Sambært ætlan verður komandi maskinmeistaraútbúgving 3 ár, eins og hon er í dag.

Fyri tann lesandi við sveinaprógvi, verður útbúgvingin økt frá 3 árum til tilsamans 4 ár íroknað atkomuskeiðið.

Bachelor maskinmeistarin kemur at lúka øll krøv, sum eru kravd smb. STCW- reglunum, eins og gjørt verður í dag.

## HVÍ BACHELOR OG IKKI PROFFESIONSBACHELOR

Hetta er eitt umrøtt evni í arbeiðsbólkinum og í fylgibólkinum. Professionbachelor er eitt danskt heiti, sum einans verður brúkt í Danmark. Tað vísir seg ikki at verða nokk fyri at lúka krøvini til víðari lestur á flestu donsku universitetum við prógvi sum proffessionsbachelor. Neyðugt er at „supplera upp“ fyri at sleppa inn til masterútbúgvingar.

Útgangsstøðið okkara er, at tann, sum er liðugur til maskinmeistara í Føroyum, skal sleppa beinleiðis inn til víðari lestur. Flestu universitet krevja „vanliga akademiskan bachelor“, fyri víðari lestur til master støðið. At ikki at taka heila fetið kann viðføra, at vit føra tey lesandi á eina blindgøtu, har vit billa teimum inn, at tey kunnu fara beinleiðis til master lestur, uttan at hetta heldur.

Dømi er um hetta, og hevur føroyskur maskinmeistari við professionsbachelor útbúgving skrivað um tað í Mið og Magn nr. 9

# Skitnu fingrarnir hvørva í turrari teori



**Tað er við skepsis, at tveir av royndu lærarunum á Vinnuháskúlanum eygleiða politisku ætlanina at broyta maskinmeistaraútbúgvingina til eina bachelorútbúgving undir Fróðskaparsetrinum. Í staðin mæla teir til at venda eygunum móti donsku skipanini við professións bachelor, sum í størri mun tekur atlit til praktiska partin.**

*Jón Brian Hvidtfeldt*

– Hvat er tað, ið vit skulu útbúgva maskinmeistarar til? Er tað ikki til vinnulívið og skipini? Og hví fert tú undir eina maskinmeistaraútbúgving? Er tað ikki tí at tú hevur áhuga fyri og ætlanir innan yrkið?

Spurningarnir og retorisku svarini koma prompte, tá prátið kemur inn á ætlanirnar at broyta gomlu maskinmeistaraútbúgvingina, soleiðis at hon verður á bachelorstøði undir Fróðskaparsetrinum. Vit eru staddir Undir Krákugjógv í Havn, og retorisku spurningarnar og svarini eiga Poul Kristian Henriksen og Páll I. Joensen, lærarar á skúlanum ávíkavist síðani 1986 og 1981. Báðir hava teir í longri tíð eygleitt ætlanina at umskipa ta útbúgving, ið teir hava arbeitt við í meira enn fjórðingsøld. Hvørgin er sannførdur um, at ætlaða leiðin nú eisini er rætta leiðin at fara.

Gongst sum Mentamálaráðið hevur fráboðað, so er hetta skúlaárið tað seinasta eftir verandi leisti, har upptøkutreytirnar til maskinmeistara eru antin 10. flokssprógv, handverkaraútbúgving innan metal/el ella SIT (støðisútbúgving innan tøkni). Tí næsta summar skulu fyrstu næmingarnir takast inn eftir nýggja leistinum, har maskinmeistaraútbúgvingin er ein trý ára



*Páll I. Joensen, lærari á Vinnuháskúlanum*

bachelorútbúgving. Arbeiðið liggur í løtuni hjá einum arbeiðsbólki undir Mentamálaráðnum. Sambært Martini Næs, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, sum er formaður í arbeiðsbólkinum, er eitt uppskot til kunngerð um útbúgving av skipsførarum og maskinmeistarum smíðað. Uppskotið hevur í summar verið til viðgerðar í Mentamálaráðnum, og tað hevur eisini verið lagt fyri politiska fylgibólkin og onnur áhugað. Sambært deildarstjóranum verður uppskotið til kunngerð í næstum sent til hoyringar hjá avvarðandi pørtum.

– Enn vita vit lærarar ikki neyvt, hvørjar upptøkutreytirnar verða næsta summar. Men tað er lætt at ímynda sær, at munandi størri dentur verður lagdur á bókligu fakini, tá útbúgvingin verður løgd undir Fróðskaparsetrið og harvið skal skipast á universitetsstigi, sigur Poul Kristian Henriksen.

Og tað er her, at ávaringarlampurnar fara at blinka hjá royndu lærarunum Undir Krákugjógv. Teir óttast snøgt sagt, at praktisku royndirnar, ið verandi útbúgving hóast alt roynir at hjúkla um og stuðla uppundir, verða køvdar av bókligum krøvum.

– Ikki tí, vit eru púra samdir við teimum, sum føra fram, at okkurt má gerast við verandi maskinmeistaraútbúgving. Í dag er trupult hjá einum maskinmeistara at sleppa undir víðari útbúgving, tí grundfak í maskinmeistaraútbúgvingini sum støddfrøði og alisfrøði verða ikki góðkend, meðan nakrir lærustovnar góðkenna høvuðsfakini innan maskin og el. Samanumtikið eru okkara maskinmeistarar tí ikki nóg væl fyri til at fara undir víðari lestur, men noyðast at taka onkur eyka modul, sigur Páll I. Joensen.

## ÓVANLIGUR ÁHUGI

Júst tí er tað kanska lagnurnar speisemi, at talið av umsøkjarum til maskinmeistaraútbúgvingina hesaferð var meira enn tvífalt so stórt sum plássini í tí eina maskinmeistaraflokkinum, ið játtanin rakk til at seta ígongd í summar. Tí hví fara undir eina útbúgving, sum skal broytast longu næsta ár, tí hon sambært serkunnleikanum ikki gevur nóg góðar framtíðarmøguleikar? Svarið er tvíbýtt, meta teir báðir lærararnir, Poul Kristian Henriksen og Páll I. Joensen:

– Man kann gita sær til, at fleiri ivast í, um teir sleppa inn næsta ár, og tí velja at søkja longu í ár. Og hinvegin kann støðan í samfelagnum hava sína ávirkan, tí í verri tíðum við minni arbeiði ynskja fleiri at fara í skúla.

Báðir eru teir sannførdir um, at árið í ár er nakað serligt, og at stóri áhugin fyri skúlanum ikki vísir alla og røttu myndina. Tí hóast teir verja praktisku førleikarnar, ið verandi útbúgvingarleistur tekur stór atlit til, so ásanna teir, at okkurt má gerast.

– Hendir einki, so tapir Vinnuháskúlin kappingin um næmingarnar, sum í vaksandi mun fara at vilja hava annað og meira enn traditionellu maskinmeistaraútbúgvingina, sigur Poul Kristian Henriksen.

Men hvat so við retorisku spurningunum frá í áðni um, hvat maskinmeistarar skulu útbúgvast til? Eru tað ikki júst argument fyri at verja verandi skipan?

Svarið liggur, sambært royndu lærarunum, í donsku skipanini.

## PROFESSIÓNSBACHELOR

Páll I. Joensen og Poul Kristian Henriksen hava fylgt væl við donsku maskinmeistaraútbúgvingini, síðani hon í 2005 varð broytt til ein professiónsbachelor. Síðstnevndi hevur í tveimum umførum undirvíst á Københavns Maskinmester- og Elinstallatørskole, seinast frá 2003 til 2006. Teir hava javnan samband við donsku maskinmeistaraskúlarnar, og so seint sum í september høvdu teir vitjan av donskum maskinmeistaralærarum í samband við eina fakliga ráðstevnu á Vinnuháskúlanum. Báðum dámar væl danska leistin við professións bachelor, sum í størri mun enn vanliga bachelorútbúgvingin samantvinnar teori og praksis.

Í stuttum eru tríggir mátar at blíva maskinmeistari eftir donsku skipanini. Hevur tú bæði miðnámsútbúgving og eina handverksútbúgving, tekur maskinmeistaraútbúgvingin trý ár. Hevur tú miðnámsútbúgving, men ikki handverksútbúgving, tekur útbúgvingin fýra og eitt hálvt ár, íroknað níggju mánaðir verkstaðsskúla og níggju mánaðir praktikk. Hevur tú handverksútbúgving, men ikki miðnámsskúla, tekur maskinmeistaraútbúgvingin trý og eitt hálvt ár, íroknað hálvt ár



*Poul Kristian Henriksen,*
*lærari á Vinnuháskúlanum*

til fyrireikingarskeið við lærugreinunum støddfrøði, alisfrøði, enskt og danskt.

– Eftir okkara tykki er hetta ein leistur, har roynt verður at taka hædd fyri praktiska partinum, samstundis sum útbúgvingin er lyft upp á bachelorstøði. Jú, víst er talan um ein professiónsbachelor, men eftir okkara bestu sannføring er hetta ikki nakar vansi fyri næmingarnar og vinnulívið, siga Páll I. Joensen og Poul Kristian Henriksen og rógva aftur á aftur argumentini um, hví ein persónur nú einaferð velur at útbúgva seg til maskinmeistara.

## DANSKI FYRIMUNURIN

Sambært teimum báðum lærarunum á Vinnuháskúlanum eru fleiri fyrimunir við at broyta maskinmeistaraútbúgvingina, so hon líkist tí donsku.

– Donsku næmingarnir eru sterkari í grundfakunum enn teir føroysku. Teir hava lættari við at formulera seg, skriva frágreiðingar osfr. Hetta er ein trupulleiki í okkara skipan, har næmingarnir duga handverkið, men ov illa at ganga í skúla, um eg so má siga, sigur Poul Kristian Henriksen, og Páll I. Joensen leggur afturat:

– Groft sagt, so sleppur man eftir donsku skipanini undan at læra næmingarnar nøkur av teimum tingunum, sum tú eftir okkara tykki eigur at duga, tá tú kemur á ein maskinmeistaraskúla. Grundleggjandi lærdóm úr skúlanum, ið vit í ov stóran mun noyðast at læra okkara næmingar.

Eftir teirra fatan gevur danska professiónsbachelorútbúgvingin eisini munandi lættari atgongd til víðari lestur, sammett við føroysku útbúgvingina ídag.

Báðir melda teir tó partvís pass til spurningin, um tað tá er so stórur, ítøkiligur munur á at taka stigið fult út og gera maskinmeistaraútbúgvingina til eina reina bachelor á universitetsstigi undir Fróðskaparsetrinum.

– Vit vita framvegis ov lítið. Her er alt ov lítið ítøkiligt komið á borðið til at gera eina neyva samanbering. Fyrsta treytin er, at man veit, hvørji upptøkukrøvini vera til maskinmeistaraútbúgvingina eftir nýggja leistinum, og tey kenna vit ikki enn. Men velur man at seta upp akademiskar forðingar, so er ivasamt, um nakað er vunnið. So er grundarlagið undir maskinmeistaraútbúgvingini skjótt burtur, siga Poul Kristian Henriksen og Páll I. Joensen, og halda fram:

– Eingin kunning hevur verið á miðnámsskúlunum fyri okkara komandi næmingum um ta ætlaðu maskinmeistaraútbúgvingina á bachelorstigi.

Báðir føra fram, at tað er lætt at ímynda sær, at teoretiski parturin kemur at fylla munandi meira, og tí verður minni pláss fyri tí handaliga.

– Praktiski parturin hevur altso nógv at siga, og tað haldi eg verður gloymt tí øllum kjakinum um at broyta maskinmeistaraútbúgvingina. Ja, satt at siga ivist eg í, um fólk eru greið yvir, at vit í Føroyum fyrireika ein akademiskan bachelor og ikki ein professiónsbachelor til at avloysa verandi maskinmeistaraútbúgving, sigur Páll I. Joensen.

## LÆRARAR Í LEYSARI LUFT

Afturat óttanum og ivanum um, hvørja lagnu maskinmeistaraútbúgvingin nú fer at fáa, hongur spurningurin um støðuna hjá lærarunum í luftini yvir Krákugjógv í dag. Tí ætlanin reisir fleiri spurningar:

– Sagt eitt sindur fýrakantað, so vil ætlanin at broyta maskinmeistaraútbúgvingina til ein bachelor undir Fróðskaparsetrinum føra við sær, at meginparturin av lærarunum á Vinnuháskúlanum ikki longur er kvalificeraður til at undirvísa, siga Poul Kristian Henriksen og Páll I. Joensen.

Spurdir, um hetta ikki eru stór orð frá tveimum lærarum við royndum, ið røkka meira enn fjórðingsøld aftur í tíðina, vísa teir báðir á, at tað jú eru ásett neyv krøv til tey, ið skulu undirvísa á universitetsstigi, ið útbúgvingin ætlandi skal flytast á.

– Tí ræður óvissa millum okkum lærarar. Vit vita ikki, um vit eru keyptir ella seldir eftir 1. august næsta ár, tá útbúgvingin ætlandi skal undir Fróðskaparsetrið, siga teir báðir við ein munn.

## BROT ÚR DAGBÓK

**29. juni: ALS**
Stýrisfundur í Trygdargrunni Fiskivinnunar.

**29. juni: Lívstrygging**
Fundur við Lív um gongdina í Samlagstryggingini

**5. juli: FSN**
Nevndarfundur, samtykt varð at leggja út hýrukrøv hjá teimum, sum ikki hava krav sítt dekkað í Nordic-málinum. FSN fer síðani at kannað møguleikan fyri endurgjaldi frá triðja parti.

**15. juli: FSN**
Blaðnevndarfundur.

**2. august: FF**
Manningarfeløgini og P/F Framherji gera eina smávegis broyting í sáttmálanum hjá Høgaberg.

**8. august: Fiskimálaráðið**
Fundur í Fiskivinnuráðnum, til viðgerðar var broyting í hjáveiðuprosenti í makrelfiskiskapi.

**22. august: Norðurlandahúsið**
Lív og Bank Nordik skipa fyri temadegi um avbjóðingar á pensjónsøkinum.

**23. august: MF**
Fundur við SSL um broytingar í arbeiðsætlan hjá Rituni.

**23. august: FSN**
Fundur við Betri Pensjón um skriv til reiðarar og limirnar. Betri Pensjón vil upplýsa meir um, at limir í FSN kunnu sjálvir velja pensjónsfelag.

**25. august: FSN**
Fundur við svenska reiðaríið MMT, sum hevur 2 skip í FAS. Sáttmáli er gjørdur fyri manningarnar. MMT ger botnkanningar og uppmátingar til frálandavinnuna. MMT hevur 400 starvsfólk av teimum eru 120 sjómenn. MMT væntar at fáa tørv á føroyskum sjómonnum nú teir hava stórar ætlanir um at víðka sítt virksemi.

**25. august: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðger uppskot um brúksskyldu, ráðið mælti frá, at óbrúkt fiskirættindi skulu seljast á uppboði. Vit mæltu til, at hesi rættindi skulu fella til teir, sum mangla dagar uttan gjald.

**26. august: Mentamálaráðið**
Fundur um uppstigan av sjóvinnuútbúgvingunum. Bjørn Kalsø í politiska fylgibólkinum nevndi, at hann vildi virka fyri, at skúlin í Klaksvík skuldi kunna útbúgva skipsførarar uttan batcelorgrad. FSN tók undir við hesum uppskoti.

**1. september: Tinganes**
Vinnumálaráðharrin verður kunnaður av manningarfeløgunum um gongdina í kæruni av FAS til ITF um at lista okkara flagg sum eitt hentleikaflagg.

**7. september: FF**
Hendrik Berlau frá danska fakfelagnum 3F greiðir frá um altjóða fakfelagsviðurskifti innan sjóvinnuna.

**12. september: FSN**
Nevndarfundur í FSN. Vit viðgjørdu sáttmálaupplegg fyri SSL. Fiskiskipasáttmálarnir vóru eisini umrøddir. Makrelveiðan í summar fekk nógva umrøðu. FSN kann als ikki góðtaka, at skip á makrelveiðu avrokna øðrvísi enn sáttmálin. Neyðug stig verða tikin fyri, at limir okkara fáa alt tað, sum teir av røttum eiga fyri makrelfiskaríið.

FSN umrøddi eisini støðuna, tá móttøkuskip lata trol til láns ímóti at skipini fáa ein lægri avreiðingarprís. Sambært sáttmálanum eigur manningin ikki at luttaka í útreiðslum til reiðskap. Neyvan ber til at gera nakað við hetta nú, men vit miða eftir, at næsta ár skal hetta ikki bera til.

**13. september: Gøteborg**
Fundur við svenska fakafelagið SEKO um sáttmálaviðurskifti, og samráðingar fyri FAS skip við svenskari manning.

**14. - 16. september: Gøteborg**
Norðurlendska Navigatør Kongressin hevur fund og trygdarseminar við sjófartsmyndugleikunum. Hesin fundur var saman við norðurlendsku maskinmeistarfeløgunum. Svenska navigatørfelagið Fartyg Befel og maskinmeistarafelagið Sjøbefel leggja nú saman. Stóra útflaggingin úr svenska flotanum er ein av orsøkunum til samanleggingina. Teir síggja, at neyðugt er at standa saman nú tað leikar so hart á.

**22. september: Argir**
Fyrsti samráðingarfundur við Lønardeildina um nýggjar sáttmálar fyri tey almennu reiðaríini.

**23. september: Fiskimálaráðið**
Fundir í Fiskivinnuráðnum.

**24. september: Vestarabryggja**
Nýggja skipið hjá Supply Service kemur til landið. Um kvøldið er veitsla í Norðurlandahúsinum.

**27. september: Tinganes**
Sjóvinnuráðið viðger kæru um manningarskjal.

# Semja um farmaskipini



Eftir drúgvar samráðingar er semja gjørd, um nýggjan sáttmála við Reiðarafelagið Fyri Farmaskip.

Sjálv lønartalvan hækkar við sama karmi, sum onnur hava fingið. Harumframt eru aðrar broytingar og dagføringar gjørdar. Viðbøturnar í frálandavinnuni og til Bólk 1 - 3 eru dagførdar við eini hækking á 10%; hesar fáa frá nú av somu hækking, sum lønartalvan.

Teir frídagar, sum kunnu nýtast til skeiðvirksemi eru nú lækkaðir frá 5 til 4. Fyri at eggja reiðarínum til, at seta nýggjar óroyndar navigatørar í starv er loyvt at 7 dagar kunnu brúkast til skeið, tvey tey fyrstu árini í starvi.

Afturgjaldskyldan fyri sera kostnaðarmikil skeið er nú orðað av nýggjum, so hon er greiðari, og nú er eitt loft sett á eitt møguligt endurgjald.

Skipanin við eyka hýru fyri ov seina avloysing, sum vit hava fyri frálandavinnuna, er nú eisini galdandi fyri onnur skip eisini, tó er endurgjaldið nakað minni.

Partarnir hava eisini avtalað eina løn og frítíðarskipan fyri teir yvirmenn, sum ikki hava neyðugu siglingstíðina, fyri at fáa kravda vinnubrævið. Vónandi fara nógvir ungir navigatørar at fáa gagn av hesi sáttmálaáseting.

Samanumtikið hava samráðingar gingið sera trekt, tí Reiðarafelagið og Vinnuhúsið hava hildið sera fast uppá, at samlaða avtalan ikki má bróta ásetta karmin. Vit hava verið noyddir at geva burtur av øðrum rættindum fyri at fáa hesar ábøtur inn.

Samanumtikið halda vit, at úrslitið er hampiligt.

## BROT ÚR DAGBÓK

**15. juni: FF**
Undirskriva avtalu um Høgaberg, kemur at fylgja sáttmálanum um Næraberg.

**17. juni: Vinnuháskúlin.**
Próvtøkuhandan.

**17. juni: Vinnuhúsið**
Sáttmálasamráðingar um farmaskip.

**20. juni: Kaffihúsið**
Fundur við Lív og Bank Nordik, nú bankin hevur keypt part av Lív.

**21. – 22. og 23. juni: Vinnuhúsið**
Sáttmálasamráðingar við Føroyar Reiðarafelag.

**24. juni: FSN.**
Blaðfundur Mið og Magn. Síðsti fundur, áðrenn blað nr. 10 verður givið út.

**28. juni: Vinnuhúsið**
Sáttmálasamráðingar um farmaskip.

**28. juni: MF.**
Fundur við Thor um makrelfiskiskap og „Franziska“

**28. juni: MF**
Fundur við umboð fyri Switzer um FAS. Sáttmáli er gjørdur fyri yvirmenninar.

**29. juni: ALS- húsið**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**29. juni: LíV**
Fundur við Lív nú MF og FSN skulu gera nýggja avtalu við Lív og yvirtaka umsitingina av samlagstryggingini.

**8. juli: MF**
Nevndarfundur: 7 mál á skránni, teirra millum eftirmeting av samráðingunum um farmaskipini. Nýggja avtalu við Lív.

**15. juli: FSN**
Mið og Magn blaðfundur.

**2. juli: FF**
Endurskoða avtaluna við Høgaberg.

**9. juli: MF**
Nevndarfundur: 11 mál á skránni, teirra millum uppsagnarmál. Norðoyggjaleiðin og mál við Fiskimálaráðið.

**12. august: FSN**
Blaðfundur fyrireika blað nr. 11.

**22. august: Norðurlandahúsið**
Evnisdagur í Norðlandahúsinum um rák og avbjóðingar á føroyska eftirlønarmarknaðinum.

**25. august: FSN**
Fundur millum MF, FSN og MMT. MMT fer at innflagga tvey av sínum skipum til FAS heilt skjótt. Skipini hjá MMT eru serútgjørd til uppmátingararbeiði, teir upplýstu, at teir longu hava sett fleiri føringar í starv.

**25. august: FSN**
Blaðfundur fyrireika blað nr. 11.

**29. august: Føroya Prent**
MF og FSN fund við Føroya prent um prenting av Mið og Magn.

**30. august: Starvsmannafelagið**
Fundurin snúði seg um kunning nú sáttmálasamráðingar fara at byrja. Til staðar MF, FSN og Starvsmannafelagið.

**31. august: FSN**
Blaðfundur fyrireika blað nr. 11.

**1. august: Vinnumálaráðið**
Til staðar John Dahl landsstýrismaður og umboð fyri FAS, RFF og FMU. Til viðgerðar FAS sum hentleikaflagg.
Semja var um at FMU, FAS og RFF skulu arbeiða við málinum soleiðis, at man fær eina felags støðu áðrenn fundin i London tann 28 oktober.

**2. august: MF**
Nevndarfundur: 11 mál á skránni. M.a. meritútbúgving, sáttmálin við RFF; fáa hann endaliga reinskrivaðan og nøkur persónsmál.

**7. september: FF og Lív**
Fundur í hølunum hjá FF við formannin í 3F um FAS skipanina. Undirskrivað nýggja avtalu um samlagstrygging.

**Vika 37: Gøtuborg**
Vanligi hálvársfundurin innan NMF, fundur við navigatørarnar í hinum norðurlondum og ein felagsfundur við Sjøfartsdirektørene.
Mál m.a. STCW konvensjónin, „Manilla 2010“, ISM og ISPS.

## MASKINMEISTARA-FELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Hans Ingvard Hansen | 7. okt. 1941 | 70 ár |
| Kári Nielsen | 25. nov. 1941 | 70 ár |
| Oddmar Petur Petersen | 23. okt. 1951 | 60 ár |
| Birgir Rasmussen | 25. nov. 1951 | 60 ár |
| Bergur Jacobsen | 12. des. 1951 | 60 ár |
| Terji Holm | 11. okt. 1961 | 50 ár |
| Fríðolvur Lervig | 21. okt. 1961 | 50 ár |
| Marner Joensen | 3. nov. 1961 | 50 ár |
| Alberg Múller | 7. des. 1961 | 50 ár |
| Jarmund Berthelsen | 20. des. 1961 | 50 ár |
| Kári Jacobsen | 30. des. 1971 | 40 ár |

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| HeiniVesturdal | 18. okt. 1941 | 70 ár |
| Leif Nolsøe | 3. des. 1941 | 70 ár |
| André Johannesen | 15. okt. 1951 | 60 ár |
| Pauli í Jansagerði | 19. okt. 1951 | 60 ár |
| Erland Olsen | 29. nov. 1951 | 60 ár |
| Jens Christian Skaalum | 13. des. 1951 | 60 ár |
| Janus Midjord | 25. des. 1951 | 60 ár |
| Hákun S. Egilsnes | 8. okt. 1961 | 50 ár |
| Eyðstein Ólason | 21. okt. 1961 | 50 ár |
| Jógvan Tróndarsson | 21. okt. 1961 | 50 ár |
| Niels Harald Michelsen | 22. nov. 1961 | 50 ár |
| Pól Kjartan Larsen | 10. des. 1961 | 50 ár |
| Andras Samson | 30. des. 1961 | 50 ár |
| Andras Samson | 21. nov. 1971 | 40 ár |
| Jákup Gøthe | 3. des. 1971 | 40 ár |
| Sverri Christiansen | 5. des. 1971 | 40 ár |
| Jógvan Bernhard Hentze | 15. des. 1971 | 40 ár |
| Símun í Vátutoft | 23. des. 1971 | 40 ár |
| Hans Jacob Petersen | 30. des. 1971 | 40 ár |




*29. september rundaði Jákup Möller, skipari, sjeyti ár. Jákup hevur verið í starvi hjá Fiskiveiðieftirlitinum síðani 14. desember 1983, og hevur verið skipari á Brimli síðan skipið kom til landið. Hann er føddur og uppvaksin Kvívík.*

Betri.fo



# Nóg nógv at liva av,
# **tá tú ert uppilagstur?**

Tosa við okkum um tína pensjón í dag

**Skjótt skulu allir føroyingar gjalda til egna pensjón, og við tíðini fara minst 15% av tíni løn til pensjón.**

**Visti tú:**

- At tú kanst draga alt inngjaldið til pensjón frá skattskyldugu inntøkuni
- At vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- At hjá okkum kanst tú velja millum kapitalpensjón, lutapensjón og lívrentu

**Set teg í samband við okkum og tekna pensjón í dag.**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón




**Størsta avbjóðing hjá einum skipara í dag:**
At vera ajour við lógir og altjóða krøv.

Skip og sigling yvirhøvur eru í dag undir nógvum eftirliti, og kemur skipið illa frá einum eftirliti, so fær tað fylgjur bæði fyri skipið og flaggið.

Ein skipari er í dag næstan líka nógv skrivstovumaður sum sjómaður.

**Útbúgving:**

- Realprógv úr Hoydølum 1971
- Studentsprógv úr Hoydølum 1975
- Stýrimansprógv frá Føroya Sjómansskúla 1983
- Skipsføraraprógv frá Føroya Sjómansskúla 1984

**Verandi starv:**
Skrivstovumaður hjá Shipping.fo har eg havi ábyrgd av manningarviðurskiftum.

**Hjúnafelagi:**
Dorit J. Kruse av Eiði.

**Børn:**
Ongi børn.

**Besta bók:**
Sjálvt um eg havi lisið nógvar bøkur, so kann eg ikki siga, at ein er betur enn ein onnur. Allar eru serligar.

**Fyrstu ferð til skips:**
1975

**Longsti túrur til skips:**
3 mánaðir við Star Viking.

**Hvørjum skipum hevur tú verðið við:**

- Róði út á Eiði frá 1975 til 1982 – meginpartin av tíðini við 30-tonsarinum Núgvunes, sum eg eisini var partaeigari í.
- Eitt vár við toskagørnum á Norðhavinum við Ægir og aftan á við snellu undir Íslandi,
- Ein summarferiutúr við Norðsøka undir Íslandi við snellu.
- Ein annan summarferiutúr við trolarinum Vestprøven undir Føroyum.
- Eitt ár sum stýrimaður við Star Saga hjá Star Shipping.
- 10 ár sum skipari við Star viking (sum fekk navnið Viking, tá Skipafelagið Føroyar yvirtók skipið).
- 10 ár sum stýrimaður og skipari við Bliki hjá Skipafelagnum,
- Hálvtannað ár sum skipari við frystiskipinum Holmfoss hjá Eimskip CTG.
- Hálvt ár við frystiskipinum Axel, sum íslendingar eiga, og sum er undir føroyskum flaggi.
- Seinastu 3 sumrini havi eg verið í Grønlandi við Missiónsskipinum Juvel II (hetta er fyrrverandi danska sjóverjuskipið Agdleq) sum stýrimaður og skipari.

**Frítíðarítriv:**
Mær dámar sera væl at lesa. Fjasist eisini eitt sindur við ættargransking.

**Bilur:**
BMW

**Telda:**
Dell

**Besti sangur:**
Her er sera torført at taka dagar ímillum. Mær dámar sera væl „Nú hvítna tindar“ ella tá Stella syngur „Nærri mín Gud til tín“ á grønlenskum.

Í 1981 vóru Ellindur Egilstrøð og eg í London til konsert hjá Pink Floyd, har teir framførdu tónleikaverkið „The Wall“ – *tað var ein uppliving fyri lívið.*

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Tá tað gongur mínum næstu væl, tá gleðist eg.

At arbeiða saman við ja-ligum fólki, tað er ein frægd.

**Hvat kann øsa teg:**
Órættvísi og tá fólk grenja, sum av røttum onki hava at grenja um.

# Nær kemur toskurin fyri seg aftur?



*Eftir Eyðstein Djurhuus*

Toskaveiðan undir Føroyum hevur verið alsamt minkandi seinastu árini. Tó hava verið einstøk ár við góðum fiskiskapi, men samlaða gongdin er heilt greið.

Hetta er hent í einum tíðarskeiði har fiskidagatalið er skert munandi, og víttfevndar toskaleiðir eru vorðnar stongdar.

Heilt væl av smáfiski var at fáa fyrr í ár, og nógv varð gjørt fyri at verja hendan fiskin. Nú verður spennandi at vita, um allur hesin toskur kemur inní fiskiskapin komandi árini.

Føroyskir fiskifrøðingar halda sera fast uppá, at tað saktans ber til at goyma fiskin til hann er vaksin størri. Eisini siga teir, „at fiskur hevur ikki stert" skilt á tann hátt, at okkara toskur rýmir ikki á aðrar grunnar.

## EILIF GAARD GESTARØÐARI

Eilif Gaard stjóri á Havstovuni var gestarøðari á aðalfundinum hjá FSN í 2010. Hann førdi millum annað fram, at vit mugu uppbyggja gýtingarstovnin av toski uppá 80 til 120 túsund tons.

Niðara markið skal forða fyri ógvusligum sveiggjum í fiskiskapinum frá ári til ár. Ovara markið skal forða fyri, at toskurin etur sítt egna avkom, tá lítil føði er í sjónum.

## SVARTFUGLURIN

Vanlukkuliga støðan hjá svartfuglinum er ræðandi. Pisurnar doyggja av svongd áðrenn tær koma á sjógvin. Nebbasild er høvuðsføði hjá fuglinum. Vit vita litið um hendan fiskastovn, hann er ikki partur av føroyskum fiskiskapi. Tó bendir alt á, at hesin stovnur er horvin ella nógv minkaður.

Teir sum hava fingist við fiskiskap vita allir, at toskurin er sera grammur eftir nebbasild. Tá fiskurin hevur nebbasild í maganum er altíð toskur í farvatninum. Um so er, at hesin týðandi parturin av føðigrundarlagnum hjá toskinum er horvin, so kann hetta verða orsøkin til, at toskaveiðan er alsamt minkandi.

## NEYVARI KANNINGAR

Havstovan eigur beinanvegin, at gera neyvar kanningar av støðuni hjá nebbasildini. Tað kann verða torført at kanna hetta fiskaslag, tí nebbasildin grevur seg niður í sandin stóran part av tíðini.

Okkara vísindamenn mugu kanna um samanhangur er millum støðuna hjá sjófuglinum og toskinum.

Hesa gongd hava vit eisini sæð í londunum sunnan fyri okkum. Toskafiskiskapurin er minkaður niður í nærum einki í ES-londunum.

Kvotur og skipatal verða skerd á hvørjum árið, men støðan tykist ikki at batna. Útblaking av smáfiski er neyvan øll orsøkin til niðurgongdina. Men í Barentshavinum er gongdin heilt øðrvísi, har er toskafiskiskapurin alsamt vaksandi. Hetta hendir hóast tær leiðirnar til tíðir eisini hava verið trároyndar av óskipaðari veiðu.

Alt hetta sigur okkum, at broytingar í náttúruni hava broytt útbreiðsluøki hjá toskinum. Tað kann væl hugsast, at vit bert mugu góðtaka, at okkara grunnar ikki geva líka nógv sum fyrr. Er føðigrundarlagið minkað, so eigur málsetning fyri uppbygging av toskastovninum eisini at lækka samsvarandi.




***Toskaveiðan undir Føroyum frá 1903 til 2010***
*Lítil roynd var undir Føroyum krígsárini 1940 – 1945, myndin vísir annars, at síðan 1985 er toskaveiðan alsamt minkað, tó hava styttri tíðarskeið verið við tí vanliga fiskiskapinum. Kelda: Havstovan.*





# Bátaførara- og SSB-skeið

Í tíðarskeiðnum 31. oktober - 4. november skipar Trygdarmiðstøðin fyri Bátaførara- og SSB-skeiðum (Skjótt-Siglandi-Báti). Skeiðini verða hildin eftir ásetingunum í STCW A-VI/2-2.









*Trygdarmiðstøðin – var fram til 1. januar 2011 ein stovnur undir Fiskimálaráðnum, men myndar í dag saman við Klaksvíkar Sjómansskúla sjóvinnuútbúgvingarnar undir leiðslu av Tekniska Skúla í Klaksvík. Samanlagdi stovnurin er samstundis lagdur undir Mentamálaráðið. Trygdarskeiðini ganga undir ásetingarnar í STCW 95 sáttmálanum, og eru í dag góðkend av IMO at veita skeið. Útboðið av skeiðum er økt munandi eins og tørvurin á grundskeiðum framvegis er stórur. Harafturat hevur Trygdarmiðstøðin gjørt onnur skeið. Trygdarmiðstøðin er føroyskt tjóðarumboð í altjóða felagsskapinum hjá trygdarskúlum (IASST)*

**Trygdarmiðstøðin**

Bøgøta 38 - FO-700 Klaksvík - Tel. 455882 - Fax 457197 - Teldupostur seasafe@seasafe.fo - www.tms.fo



# Tænastur til skip

***Tváttur leigar út og vaskar klæði til einstaklingar, vinnufyritøkur, og almennar stovnar.***

Ein tænasta, ið Tváttur bjóðar, er at taka sær av koyggjuklæðunum hjá sjófólki. Tá ið skipini koma inn, tekur Tváttur sær av brúktu klæðunum og letur rein koyggjuklæði umborð til næsta túrin.

Sí meira á okkara heimasíðu, ella set teg í samband við okkum.



*Vit eru altíð fús til eitt vaskiprát*

**tváttur**

**– rein tænasta**

Sp/f Tváttur • Sýnávegur 4 • 480 Skála

tel. 441840 • far. 227785 • www.tvattur.fo • tvattur@tvattur.fo

# Fundur um sjóvinnumál í Gøteborg



*Tekstur: Sjúrður Heinesen*

Í døgunum 14 – 16. september hildu norðurlendsku samtøkini fyri maskinmeistarar og navigatørar fundir í Gøteborg. Í hesum sambandi var eisini skipað fyri einum felagsfundi, har stjórarnir fyri norðurlendsku sjóvinnumyndugleikarnar eisini luttóku.

Til staðar vóru umboð fyri øll tey norðurlendsku yvirmannafeløgini, og stjórarnir fyri tær flestu norðurlendsku sjóvinnufyrisitingarnar. Íslendsku og finsku stjórarnir høvdu tó givið avboð.

Føroysku umboðini á hesum fundi vóru: Tommy Petersen, Páll Hansen, Eyðstein Djurhuus, Anfinn Garðalíð, Ólavur Biskopstøð og Sjúrður Heinesen.

Fylgjandi mál vóru viðgjørd á fundinum:

## SJÓVINNUPOLITIKKUR: SVØRÍKI

Svenski sjóvinnustjórin helt, at teir hava ein Ikki eksisterandi sjóvinnupolitikkur. Hann nevndi her m. a. ta stóru útflaggingina og hann segði seg ikki vita, hvat stjórnin ætlar á sjóvinnuøkinum. Svensku myndugleikarnir hava nú so lítið at gera, at teir fara at siga eftirlitsfólk úr starvi.

## SJÓVINNUPOLITIKKUR: DANAMRK

Danski sjóvinnustjorin vísti á valið, sum var sama dag og vísandi til hetta segði hann seg ikki vita neyvt, hvussu framtíðin verður. Hann vísti á, at samlaða tonsatalið í heiminum er vaksandi og tí má skiparakstur optimerast, og sostatt mugu umkostningarnir minimerast. Nevnt varð eisini, at reiðaríini eru vorðin heilt global og tey plasera seg har, sum umkostningarnir eru lægstir. Víst varð eisini á, at ES hevur nógv at siga innanfyri sjóvinnu generelt. Víðari varð sagt, at trygd og umhvørvi fer at vera hægri prioriterað. Danski sjóvinnustjórin nevndi eisini, at Fólkatingið hevur samtykt, at framyvir kunnu helvtin at skiparum vera ikki-europearar og hetta fyri at økja um fleksibilitetin av arbeiðsstyrkini.

## SJÓVINNUPOLITIKKUR: BOREG

Norski segði, at Noreg hevur nógvan sjóvinnupolitikk – ja kanska ov nógvan og hetta ger, at viðurskiftini er ikki nóg støðug.

Hann vísti á, at tað eru nógv øki í norskari sjóvinnu. Hann nevndi fiskaskap, altjóða handlisskipasigling, innanríkis strandasigling og frálandavinnu. Upplýst varð, at 60 % av norska flotanum er útflaggaður. Her er ofta talan um skip í frálandavinnu aðrastaðni í verðini, har tað er eitt krav frá viðkomandi londum, at skip eru undir teirra flaggi.

Frálandaflotin er næststørstur í verðini og sera framkomin. Fiskiskip eru eisini sum heild eisini nýmótans skip, meðan skip i strandasigling ofta eru eldri skip og her er útflagging ein trupulleiki. Orsøkin er, at skip undir NIS kunnu ikki sigla í strandasigling og tí verða tey útflaggaði. Nógv innanríkis sigling er tí við skipum undri fremmandum flaggi og tað er ein trupulleiki.

## SJÓVINNUPOLITIKKUR: FØROYAR

Føroyski sjóvinnustjórin segði, at traditionelt hevur føroysk sjóvinna í høvuðsheitum bara verið fiskiskapur, men seinastu árini hevur man satsað upp á at fáa økt um handilsskipaflotan við at fáa fleiri skip í FAS. Tað hevur víst seg, at nógv skip koma Í FAS úr norðurlendskum londum. Upplýst varð, at føroyskir sjómenn í handilsskipasigling hava silgt við donskum skipum, men nú eru fleiri og fleiri, sum sigla undir føroyskum flaggi. Stjórin segði, at føroyska fyrisitingin er auditerað av IMO og annars so er nógv samstarv við donsku Søfartsstyrelsen. Viðvíkjandi innflagging var upplýst, at roynt verður at hava eitt høgt støði á skipunum og m. a. verður kravt, at tey eru yngri enn 20 ár.

## ORÐASKIFTI

Nakað av orðaskifti var um framløgurnar hjá sjóvinnustjórunum. Tosað varð m. a. um hetta fyribrygdið, at reiðaríir at „shoppa“ fyri at finna bíligasta flaggið at skráseta skipini í. Hetta hava teir gjørt leingi, men nú er eisini talan um innanhýsys kapping í norðanlondum.

Tað tóktist at vera greitt, at tað eru serliga normenn, sum hava trupulleikar við at skip í strandasigling hava frammanda manning. Teir meta, at her er í ávísan mun talan um sosiala dumping. Víst var annars á, at nógvur flutningur í Noreg fer fram við slíkum skipum og tað veður helst meira sjóflutningur framyvir, fyri at avlasta vegirnar.

Frá danskari síðu varð víst á, at tað hevur størri týdning at tiltrekkja góða arbeiðskraft heldur enn at vera protektionistiskir, tí framyvir verður stór kapping um dugnaligt fólk.

Danski sjóvinnustjórin segði, at norðanlond hava vunnið almikið upp á at vera international.

Hinvegin var eisini víst á, at tað kennist sum ein kynisma, tá ið stórur munur er á lønar- og setanarviðurskiftum hjá manningum á sama skipi og tað tykist sum nógvigr reiðarar einans hugsa um at fáa so bíliga arbeiðsmegi, sum gjørligt.

## STCW-SÁTTMÁLIN VIÐ ATLITI TIL IMPLEMENTERING AV MANILLA ÍSKOYTINUM.

Talan er um munandi størri krøv til upplæring av sjófólki. Hildið varð, at hetta helst verður lagt til reiðaríini at taka sær av um tað ber til. Tað er tó enn nógv, sum er nakað óklárt hesum viðvíkjandi.

Talan er um altjóða relgur, sum verða ásettar, sum frá líður og helst veðru hetta liðugt í 2017.

## ISM

Ein norskur luttakari helt, at royndir og hagtøl frá ISM-stýriskipanini verða ikki brúktar til nakað og tað undraðist hann á. Her tosa vit um vanlukkur og eisini „næstan vanlukkur“.

Danskur luttakari helt, at tað er týdningarmeiri at fokusera upp á sjálva trygdina heldur enn skemaðini. Hann nevndi dømi um vanlukku, har alt pappírarbeiðið var í lagi! Hann helt tó ikki, at ISM skal avtakast, men fokusið eigur at vera á trygdina sjálva.

Føroyski sjóvinnustjórin vísti á, at smá reiðaríir ofta hava tørv á betri kunning frá myndugleikunum og hann upplýsti, at hetta hava teir sett fólk til at taka sær av.

Formaðurin í Maskinmeistrenes forening tosaði um uppgavur hjá maskinmeistarum o. ø. í mun til uppgávurnar hjá navigatørunum. Hann helt, at størri og størri uppgávur verða lagdar á hvønn einstakan persón og tað er ein trupulleiki. Hann tosaði eisini um vøggu til vøggu hugtakið, sum snýr seg um, at orsakað av manglandi rávørum sum frá líður, so skulu allir lutir í einum skipi kunna endurnýtast og tí verður kravið til skipaða skráseting helst økt.

## ISPS – HÓTT SIGLIØKIR/ SJÓRÆNARAR – VÁPNAÐIR VAKTIR

Nevnt varð, at tað kann vera trupult hjá manning at koma umborð ella í land orsakað av strongum eftirliti. Christer Lindvall úr Svøríki, sum fæst við hetta í IMO, hevði eitt stutt innlegg um hesi viðurskifti. Hann greiddi frá teimum ymisku verjutiltøkunum, sum IMO hevur gjørt í samband við hetta og staðfesti, at hagtølini vísa, at tey virka.



aðir, tí man var bangin fyri at hann hvarv, um hann slapp til Kina. Tað var ein lokalur politiákæri, sum hevði heimild at krevja hetta. Víst var á, at orsøkin var, at havarikommisiónin hevði havt so leingi um at koma við einari niðurstøðu. Norski sjóvinnustjórin segði tó, at talan eisini er um inkompetencu hjá politinum.

Onnur enn verri dømi vórðu nevnd um sjómenn, sum sita leingi uttan at nøkur ákæra verður reist í heila tikið.

Talan er mest um guidances og upplýst varð, at IMO ynskir ikki at brúka vápnaðar vaktir umborð.

Víst varð á, at tað er sera trupult at seta vápnaðar vaktir, tí at krøvini til slíkar eru sera strong. Í Danmark eru 49 slíkir vaktir góðkendir higartil. Nevnt var annars, at upp á longri sikt kann tað blíva eitt problem, um partarnir fara at vápna seg betri og betri.

Tað er eini ein spurningurin um hvønn status, vaktir skulu hava umborð – altso viðvíkjandi mynstring o. s. v.

Geitt var frá, hvussu reglurnar eru viðvíkjandi vápnaðum vaktum í teimum ymisku londunum og tað er eitt sindur ymiskt – eisini hvat ministerium hevur ábyrgdina og talan er vanliga ikki um sjóvinnumyndugleikan.

Tað eru annars eisini stórir juridiskir spurningar í hesum, tí talan kenn jú vera um at drepa fólk og tað kann verða ein spurningur um at plasera eina ábyrgd.

## ÁSETAN AV MANNING

Spurningurin um, hvussu manning verður ásett, var reistur og í hesum sambandi varð m. a. víst á „IMO guidelines for safe manning“.

Tað vóru ymiskar áskoðanir um hvussu slíkt skal metast. Danski sjóvinnustjórin helt, at man má hyggja upp á hvørt einstakt skip og meta um, hvussu manningin skal samansetast. Hann helt, at tað kunnu vera nógvir mátar at manna eitt skip upp á.

Norski sjóvinnustjórin segði, at hjá teimum er tað soleiðis nú, at reiðarin hevur ábyrgdina av tryggum rakstri og hann nevndi, at tað kann vera ein spurningur um fólkini hjá myndugleikanum eru meira kompetent at meta um hetta enn tey, sum fáast við dagliga raksturin.

Føroyski sjóvinnustjórin vísti á, at í Føroyum verður í stóran mun gingið eftir donskum mannagongdum.

## CRIMINALIZATION OF SEAFARERS - CASUALTY INVESTIGATION CODE, „FEAR TREATHMENT“

Her er talan eitt nú um at manning verður dømd fyri eitt nú ólógliga last, sum verður funnin umborð, men sum manningin einki hevur við at gera. Ósekir sjómenn hava fingið langar dómar í onkrum slíkum førum.

Nevnt var dømi um ein kinesara, sum var eftirhildin í Noreg í 7 mán-

## SJÓBJARGING

Nevnt varð, at undirvísing í bjarging ofta er á lágum støði. Spurningurin var reistur um vit eru komin longri síðani Estoniu. Onkur helt, at tað var man í grundini ikki viðvíkjandi sjálvari bjargingini. Hinvegin so er ymiskt á øðrum økjum, t. d. við betri brandútgerð og betri konstruktión av skipum.

Svenski sjóvinnustjórin segði, at útgerð skal sjálvandi vera tøk, men ofta er talan um sera ringar umstøður viðvíkjandi veðri, temperaturi o. a. og tað er mark fyri, hvussu væl man kann tryggja seg.

Tosað varð eisini um hvussu manningin er skikkað til bjargingararbeiði og eitt dømi varð nevnt, har manningiin var so óskikkað til uppgávuna, at teir dugdu ikki at fáa ikki vatn á slangurnar. Tað er sostatt eisini av størsta týdningi, at manning alla tíðina verður skúlað í trygdini og at trygd má vera ein fastur partur av hugsunnarháttinum hjá manningini.

# Elias Johannesen: So gott sum heima

Sjónet er nýggj tænasta frá Føroya Tele, sum gevur sjómonnum, ið fiska undir Føroyum, møguleika at fáa alt við umborð. Á Vesturtúgvu fegnast menn um nýggju tíðirnar.

Sambandið er akkurát líka gott sum heima, sigur Elias Johannesen, skipari á Vesturtúgvuni.Teir hava havt Sjónet í góðar tríggjar mánaðir.

## ÚTBYGT SJÓNETIÐ

Føroya Tele hevur útbygt Sjónetið, sum bjóðar breiðband við fullari ferð heilt út á fiskileið. Hetta merkir skjótt og nútímans samskifti gjøgnum eitt nú internet og teldupost. Tekniskt eitur tað, at Sjónet bjóðar upp til 7 Mbit/s út á 60-70 fjórðingar úr landi.

Vesturtúgva er útgjørd við einari uttandura-antennu, ið tekur móti signalinum frá Føroya Tele, og so verður sambandið beint víðari út á einstøku kømurini umborð, so hvør maður hevur internetsamband.

„Hetta hevur fullkomiliga broytt lívið umborð – bæði arbeiðsliga og privat," sigur Elias Johannesen.

## EITT DYGDARGOTT SAMSKIFTI

Á brúnni verður góða internetsambandið brúkt til at eitt dygdargott samskifti við reiðarí, eftirlit og myndugleikar, og eitt nú er tað vorðið nógv skjótari og lættari at fáa eitt nýtt veðurkort fram.

Hjá manningini gevur skjóta ferðin manningini møguleika at fylgja nógv betur við.

„Menninir fáa brúkt sambandið at kunna seg við alt, sum fer fram í landi. Teir eru á facebook, hava samband við vinir og kunnu fylgja við politikki, fótbólti ella kappróðri, og hvat annars rørir seg," sigur skiparin.

## FAMILJAN HEIMA

Serliga eru menn glaðir fyri at fáa fylgt familjuni heima.

„Nú kunnu menn síggja og tosa við børnini gjøgnum Sjónetið, og teir hava yvirhøvur somu møguleikar sum fólk heima við internetinum. Teir kunnu tosa við konuna, meðan teir liggja í koyggjuni, so tað er sjálvandi púra óhugsandi at venda aftur til tað gamla," sigur skiparin og flennir.

Hóast menn nú hava bæði heimið og allan heimin í kahúttuni, so hevur tað ikki gingið út yvir samanhaldið umborð. Tvørturímóti er meira at tosa um, nú teir fáa alt við.

„Eg vænti, at hetta verður eitt heilt natúrligt krav hjá øllum sjófólki," sigur Elias Johannesen, skipari á Vesturtúgvu.



*Elias Johannesen, skipari á Vesturtúgvu, heldur tað vera eitt sindur av einari kollvelting, at tað nú ber til at fáa internet umborð við somu ferð sum í landi. „Hetta hevur riggað heilt ótrúliga væl," sigur royndi skiparin.*

**Sjónet er langtrøkkandi internet frá Føroya Tele til skip undir Føroyum. Tað gevur upp til 7Mbit breiðband og røkkur 60-70 fjórðingar úr landi.**




*Vesturtúgva – nú við skjótum interneti til manningina út á 60 fjórðingar*

# Saeborg kom til Føroya 24. september

Leygardagin 24. september kom Saeborg á Havnina har stór mannfjøld tók ímóti nýggja skipinum hjá Supply Service. Skipið, sum er smíðað í Turkalandi og liðugtbygt í Norra, er nakað størri enn Eldborg, sum var fyrsta frálandaskipið hjá felagnum. Umframt at sigla sum veitingarskip, er skipið eisini útgjørt til bjarging og oljurudding. Í sambandi við oljurudding hevur skipið kapasitet til 1.930 m3. Manningin á Saeborg er føroysk. Skiparar eru Tórhallur Staksá og Hans Pauli Henrysson. Manningin telur 12, og tað verða sostatt 24 mans knýttir at skipinum.



*Jens Meinhard Rasmussen og konan, Jóhanna Rasmussen, var gumma og doypti skipið, tá tað lá við vestaru bryggju í Havn.*

# SAEBORG KOM TIL FØROYA 24. SEPTEMBER

*Eystein Djurhuus saman við skipara og stýrimanni*





*Maskinstjórin og maskinmeistari í kontrolrúminum*

## DET NORSKE OLJESELSKAP

Skipið hevur longu fingið sáttmála við Det Norske Oljeselskap og Faroe Petroleum. Sáttmálin er fyri 4 brunnar, og er mett at vara í 8-10 mánaðir.

Umframt veiting til boripallin Maersk Guardian í Norðsjógvinum, fevnir sáttmálin eisini um oljurudding og rescue.

Jens Meinhard Rasmussen, stjóri í Supply Service sigur, at tey ynskja at menna og vaksa um reiðaríið støðugt, og hesi bæði nýggju skipini eru sjálvsagt ein týðandi partur av hesi menningarætlan.

## MAIN PARTICULARS

| | |
|---|---|
| LOA: | 86.00 m |
| LPP: | 74.40 m |
| Breadth, moulded: | 17.60 m |
| Depth to Main Deck: | 7.70 m |
| Depth to A Deck: | 10.50 m |
| Maximum Draught: | 6.40 m |
| Deadweight at 6.40 m draught: | 4300 Ton |
| Cargo deck area: | 901 m2 |
| Accomodation: | 24 |
| Speed: | 15 Kn |

*Ein av 4 høvuðsmotorum*





*Rúmligt er í maskinrúminum*

**CAPACITIES**

| | |
|---|---|
| Fuel Oil: zDeck Cargo (G=0.9 m ab. deck): | 2500 ton |
| Deck area: | 901 m2 |
| Oil recovery: | 1930 m3 |
| Methanol (LFL*): | 175 m3 |

**CLASSIFICATION**

Det Norske Veritas: DnV + 1A1, E0, SF, DK(+), HL(2.8), LFL*, COMF-V(3), CLEAN DESIGN, NAUT OSV, DYNPOS-AUTR, OILREC.

**MANOEUVERING AND PROPULSION SYSTEM**

Main Engines: 4 x MTU 12V4000M33S (1560 bkW) with NOx reducing catalyst systems
Propulsion: 2 x Schottel main azimuth thrusters, 1600 kW each
Bow Thruster: 2 x Brunvoll FU-74-LTC-2000 880 kW
Emg. Generator: 1 x 99 kW Volvo
Prepared for: 1 x 800 kW retractable azimuth thruster


liv.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Persónlig eftirløn
Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa
tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Innlit í útlit
ekko 239 239